# Fororð

14. september er ein serstakur dagur í Føroya søgu. Tí á hesum degi valdi Føroya fólk at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land – í 1946. Hesin vilji fólksins varð tó ikki framdur í verki. Síðan hetta hava skiftandi landsstýri stjórnað Føroya landi, og hava vit flutt okkum áfram móti einum alsamt meira sjálvstøðugum samfelag.

14. september 2015 var eisini ein serstakur dagur. Tá varð samgonguskjal undirskrivað av Javnaðarflokkinum, Framsókn og Tjóðveldi. Málið var greitt. At skipa einar meira sjálvbjargnar, samhaldsfastar og tíðarhóskandi Føroyar. Fóru til verka beinanvegin. Úrslitini tala fyri seg.

Ongantíð hava so nógv fólk búð í Føroyum. Eru nú fleiri 51.000. Ongantíð hava so nógv størv verið í Føroyum. Eru nú fleiri enn 27.000 løntakarar. Ongantíð hevur virðið av tí, ið vit skapa hvønn dag verið so stórt sum nú. Bruttotjóðarúrtøkan er nú meira enn 19 milliardir um árið.

Hetta er at fegnast um og er eitt úrslit av øllum tí, sum fólk skapa kring landið alt, hvønn dag. Øll samfeløg hava avbjóðingar. Soleiðis er eisini í Føroyum. Settu okkum tí beinanvegin fyri at loysa nakrar av stóru avbjóðingunum fyri at skapa enn størri trivna og framgongd fyri alt fólkið.

*Frá fólkaminking - til varandi fólkavøkstur.* Tí eru sett í verk fleiri nýggjar útbúgvingar kring landið, hægri lestrarstuðul, barsilstíðarskeiðið longt 6 vikur, barnafrádrátturin hækkaður munandi, íløgur í fiskivinnunýmenning, ferðavinnumenning og kreativar vinnugreinir, umframt fleiri lestrarbústaðir og byggja nú 300 nýggjar leigubústaðir.

*Frá vaksandi ójavna - til eitt javnari býti av ríkidøminum í landinum.* Tí er skattalætti veittur lág- og miðalløntum, pensjónistar og fyritíðarpensjónistar hava fingið meira at liva av, og somuleiðis stakir uppihaldarar og barnafamiljur við fíggjarliga trongum korum. Eisini eru 200 milliónir krónur settar av til nýggjar bústovnar til tey, ið hava størst tørv á hjálpandi hond. Samstundis rinda teir partar av samfelagnum, ið hava havt stór avlop seinastu árini, alivinnan og uppsjóvarvinnan, nakað meira til vælferðarsamfelagið.

*Frá olju – til grønari Føroyar.* Tí eru fleiri átøk framd at eggja fólki at velja grønar loysnir. MVG-afturbering til grønar hitaskipanir í húsum, umframt til keyp av el- ella vetnisakfari. Lægri el-prís um valt verður at nýta grønar loysnir. Grøn jarðhitaskipan til stásiliga Glasir. Náttúruverndarlóg er nú ávegis, eins og útbjóðing av vindmyllulund fyri at fáa økta framleiðslu av grønari orku.

*Frá parkeraðum nýskipanum - til nýskipanir í verki.* Tí eru bæði pensjónsnýskipan, fiskivinnunýskipan og heilsunýskipan framdar.

*Frá halli og búskaparligum óhaldføri – til munandi avlop og styrkt búskaparligt haldføri.* Tí er hall í 8 ár á samanlagt 3 milliardir krónur, frá 2008 til 2015, vent til avlop á omanfyri 1 milliard krónur fyrstu 3 árini hjá samgonguni. Skuld landsins minkar og uppsparingin í Búskapargrunni Føroya veksur. Hartil er bygnaðarligt hall vent til avlop, og langtíðarhaldførið styrkt.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2019 er fjórða og seinasta fíggjarlógin í hesum samgonguskeiðnum. Bygt verður víðari á tað, ið framt er, og verða enn fleiri átøk framd fyri at røkka málunum, ið samgongan hevur sett sær.

Avlop á góðar 400 milliónir krónur verður rokkið við vøkstri í inntøkum, vegna framgongd í samfelagnum, málrættaðum íløgum, og einum varligum rakstrarvøkstri á 2,6%, íroknað lønarvøkstur og við søguliga stórum fólkavøkstri.

Nýggjar útbúgvingar, bústaðarpakki, styrkt Fróðskaparsetur, nýtt avloysaraskip, tunlar, fleiri serlæknar, pensjónistar minst 1.000 krónur meira at liva fyri, frá 40% pensjónsflatskatti til stigvaksandi pensjónsskatt úr 30% upp í 40%, nýggj sendistova, náttúruverndarlóg, meira fiskivinnunýmenning og munandi afturgjalding av skuld eru millum mongu átøkini komandi ár. Átøk, ið bera okkum fram á leiðini móti einum meira sjálvbjargnum, samhaldsføstum og tíðarhóskandi Føroyum.

Samstundis kunnu vit fegnast um, at vit hava bygt búskaparligu framgongdina seinastu árini á munandi burðardyggari grundarlag, enn vit hava sæð, tá búskaparlig framgongd hevur verið áður. Tí talan er fyrst og fremst um framgongd vegna økta virðisskapan, útflutning og íløgur í landinum.

Eitt nú gera fleiri vinnufyritøkur stórar íløgur í styrkt kappingarføri og framtíðar vøkstur í virkseminum. Samstundis síggja vit, at framgongdin ikki er grundað á lántøku, so sum vit áður hava sæð, tá framgongd hevur verið. Vit bjálva okkum sum samfelag, tí bæði fólk, vinna, kommunur og land minka skuld og spara meira upp, enn tey lána. Hetta ger okkum sterkari sum samfelag at møta framtíðar avbjóðingum og broytingum, sum altíð vilja koma.

Úrslitið er, at virðisskapanin í okkara landi - sokallaða bruttotjóðarúrtøkan - nú hevur yvirhálað nøkur av grannalondum okkara, tá vit rokna hesa í mun til hvønn íbúgva.

Búskaparliga hava vit helst ongantíð verið so fjøltáttað og væl fyri sum nú. Samfelagsliga hava vit helst ongantíð verið so samhaldsføst og tíðarhóskandi sum nú. Sum land og fólk hava vit helst ongantíð verið so sjálvbjargin sum nú. Komandi 14. september hava landsstýrið og samgongan stjórnað Føroya land í 4 ár.

Hóast fólksins avgerð frá 1946 enn ikki er framd í verki, so er at fegnast um, at vit hava tikið risafet framá móti einum sjálvbjargnum, samhaldsføstum og tíðarhóskandi Føroyum. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2019 flytur okkum enn longur framá móti málinum.

28. september 2018

Kristina Háfoss
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

# Innihald

Fororð ........ 1
Innihald ........ 3
Inngangur ........ 4
Lýsing av gongdini í búskapinum ........ 6
Almenn fíggjarmál ........ 23
Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2019 ........ 30
Inntøkur landskassans í 2019 ........ 31
Útreiðslur landskassans í 2019 ........ 31
Løgur í 2019 ........ 32
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2018 ........ 34
Rakstrarútreiðslueftirlit ........ 37
§ 1 Løgtingið ........ 37
§ 2 Løgmansfyrisitingin ........ 38
§ 3 Fíggjarmál ........ 39
§ 5 Fiskivinnumál ........ 40
§ 7 Mentamál ........ 42
§ 11 Heilsu- og innlendismál ........ 44
§ 12 Almannamál ........ 46
§ 13 Uttanríkis- og vinnumál ........ 48
§ 17 Samferðslumál ........ 49
§ 20 Inntøkur ........ 50
Løgujáttanareftirlit í fíggjarárinum 2018 ........ 52

## Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

Úrslitið hjá landinum í 2017 var eitt avlop á 563 mió. kr. Góða úrslitið hjá landinum í 2017 stavaði fyri ein stóran part frá, at inntøkurnar frá skattum og avgjøldum vóru hægri enn roknað varð við í fíggjarlógini orsakað av búskaparliga góðum tíðum. Harafturat vóru ávísar óvanligar inntøkur í 2017, sum gjørdu úrslitið betri enn væntað. Heldur verandi gongd fram, fer landið sannlíkt at hava avlop í 2018 á smáar 300 mió. kr. Sostatt hevur landskassin nú havt stór avlop í fleiri ár á rað fyri fyrstu ferð í omanfyri 15 ár.

Fíggjarpolitiska málið hjá landsstýrinum er, at landskassin hevur vaksandi avlop næstu árini. Á henda hátt verður betri fíggjarpolitiskt rásarúm at standa ímóti við í framtíðini. Stórt trýst verður á útreiðslurnar hjá landi og kommunum næstu árini, millum annað orsakað av broyttari fólkasamanseting. Eisini kann hugsast, at stóri búskaparvøksturin síðstu 5-6 árini fer at minka til eina meiri vanliga gongd næstu árini.

Framrokningar av inntøkum og útreiðslum í uppskotinum eru dagførdar og grundaðar á verandi lóggávu og bundnar raðfestingar. Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019 eru framroknaðar við støði í søguligum tølum fyri inntøkur og annars við støði í fyritreytum og lóggávu, sum er galdandi í løtuni. Inntøkurnar eru framroknaðar við ársins prísum í 2019 og framroknaðar við føstum prísum árini 2020 og frameftir.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu sveiggjunum, sum eru í samfelagnum yvir tíð. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum í framtíðini. Til ber at gera forsagnir og at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin kann spáa neyvt um búskaparvøkstur fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans í framtíðini lesast við fyrivarni.

Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, av tí at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtykt er, at almennu Føroyar skulu bjóða. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Búskaparpolitiska avbjóðingin er, at tiltøk, sum betra um javnvágina millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum, kunnu samstundis tálma eftirspurning og búskaparvøkstur og tí eisini ávirka inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skatta- og avgjaldsinntøkurnar, ávirka í flestu førum eftirspurningin í samfelagnum og tí eisini í ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina síðstu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl.

Eisini verða metingar hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum brúktar sum partur av grundarlagnum at meta um búskaparvøksturin og inntøkurnar hjá landinum næstu árini.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2019 verður vøksturin í flestu inntøkunum mettur til um 3%. Metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er grundað á eina varsemisreglu og á ta óvissu, sum annars er um gongdina næstu árini.

Skattir og avgjøld, ið eru grundað á inntøku og nýtslu, til dømis vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settir at fylgja á leið sama vøkstri sum BTÚ í 2019 og árini eftir. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt, og har, ið umstøðurnar tala fyri tí.

Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini komandi 1-2 árini.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðani er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar-, løgu- og inntøkujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini 2018.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Stór framgongd hevur verið í føroyska búskapinum í fleiri ár, og framgongdin heldur fram í ár. Vøksturin tók av álvara dik á seg í 2013 og hevur staðið við síðan. Fíggjarmálaráðið roknar í løtuni við, at vøksturin, sum frálíður, fer at hæsa nakað av og vera á einum vanligari støði. Í mynd 1 niðanfyri síggjast metingar av gongdini í bruttotjóðarúrtøkuni síðstu árini, og væntaði vøksturin í 2018 er eisini vístur í myndini.

**Mynd 1**
**Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 1999-2018**




Viðm.: Tølini fyri 2016 til 2018 eru fyribils metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Búskaparráðnum.

Sambært metingum hjá Búskaparráðnum og Hagstovuni hækkaði bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) í ársins prísum 6-7% í 2016 og í 2017. Búskaparráðið og Hagstovan rokna við, at BTÚ í ársins prísum veksur um 2% í ár.

Metingarnar eru grundaðar á eina varsemisreglu og yvirhøvur á ta óvissu, sum knýtir seg at tílíkum forsagnum um gongdina í framtíðini. Eins og greitt verður frá niðanfyri, eru fleiri óvissur um gongdina næstu árini, sum tala fyri, at ein varsemisregla eigur at verða nýtt í sambandi við forsagnir um gongdina næstu 1-2 árini.

Óvissa er millum annað um, á hvønn hátt Bretland fer úr ES-samstarvinum. Eftir verandi tíðarætlan fer Bretland úr ES-samstarvinum í mars mánaði næsta ár. Skiftistíð verður eftir øllum at døma galdandi fram til ársenda 2020. Enn er kortini ikki greitt, hvørjar avtalur og sáttmálar vera galdandi millum Bretland og ES, til dømis um handilssamstarv, felagsmarknaðin, tollsamgongu og annað búskaparligt samstarv.

Í politisku skipanini í Bretlandi eru stórar ósemjur um, á hvønn hátt Bretland eigur at fara úr ES-samstarvinum, og nógv er eftir at samráðast um millum Bretland og ES í sambandi við Brexit. Fyri Føroyar verður millum annað viðkomandi, hvørjar avtalur Bretland fer at gera við onnur lond innan fiskivinnu. Bretland er sum kunnugt millum størstu útflutningsmarknaðirnar hjá føroysku fiskivinnuni, og nakað av aldum laksi er eisini útflutt á bretska marknaðin síðstu árini.

*Roknast kann við meira vanligum vøkstri næstu árini*

Fleiri viðurskifti hava stimbrað búskapin síðstu árini og hava gjørt sítt til stóru framgongdina í búskapinum. Millum annað kann nevnast, at føroyski fiskiskapurin eftir uppsjóvarfiski er vaksin munandi, og at stórar íløgur eru gjørdar í móttøkuorku og víðariframleiðslu á landi. Gongdin í alivinnuni hevur eisini verið serstakliga góð síðstu árini.

Fíggjarmálaráðið hevur í nøkur ár roknað við og lagt upp fyri í inntøkumetingum, at óvanliga stóri vøksturin, sum hevur verið síðani 2013, fór at hæsa av og at vøksturin fór at gerast meira vanligur, sum frálíður. Hóast hetta ikki kann staðfestast við vissu, síggjast tekin um, at vøksturin hæsar nakað av í ár og í 2019.

Fólkatilflytingin til landið er methøg í løtuni, og fyribils bendir einki á, at tilflytingin ella fólkavøksturin fara at hæsa av í bræði. Fyri føroyska búskapin sum heild er tað eitt sera gott tekin, at nettotilflyting er til landið og at fólkatalið veksur. Metstóra tilflytingin av fólki og góða gongdin á arbeiðsmarknaðinum benda á, at búskaparvøksturin kann halda fram næstu árini, hóast vøksturin sannlíkt ikki verður eins stórur og síðstu 4-5 árini.

Føroyski búskapurin er framvegis stimbraður av óvanliga lágum rentustøði. Harafturat vóru oljuprísir lágir í 2014 og 2015, men eru síðani hækkaðir aftur síðani ársbyrjan 2016. Bara síðsta árið eru altjóða oljuprísir hækkaðir omanfyri 40%. Koma fleiri ógvusligar príshækkingar á olju fyri næstu árini, fer hetta at skala búskaparvøksturin í Føroyum og í øðrum londum, sum innflyta nógva olju. Oljuprísirnir eru framvegis undir prísunum, sum vóru í 2012 og 2013. Í løtuni eru ikki útlit til, at oljuprísir í bræði fara at hækka aftur til støðið, sum var í 2012 og 2013.

Í løtuni eru heldur ikki útlit til, at altjóða rentustøðið hækkar stórvegis næstu tíðina. Roknast kann framvegis við lágum rentum næstu 1-2 árini. Rentustøðið kann sjálvsagt hækka nakað úr verandi óvanliga lága støði næstu 1-2 árini, men forsagnir benda ikki á, at rentustøðið fer at hækka serstakliga nógv.

Nevnast kann, at eftir aldarskiftið fyri 17 árum síðan var føroyska bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva 20-25% lægri sammett við okkara grannalond, Danmark og Ísland. Stóri búskaparvøksturin, sum hevur verið í Føroyum eftir aldarskiftið, hevur havt við sær, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva nú kann metast at vera á sama stigi sum í okkara grannalondum, Danmark og Íslandi.

Føroyska bruttotjóðarúrtøkan er vaksin úr um 188 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í ár 2000 til mettar um 375 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2018. Hetta er á leið á sama stigi sum í okkara grannalondum Danmark og Íslandi. Í Danmark var bruttotjóðarúrtøkan mett til 373 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2017, og í Íslandi var bruttotjóðarúrtøkan mett til um 390 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2017.

*Fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi síggjast í pørtum av búskapinum*

Ábendingar síggjast um fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi, serstakliga innan byggivinnuna og aðrar handverksvinnur. Hetta kemur sjálvsagt av nógva byggivirkseminum, sum er í landinum. Byggivinnan er vaksin sera nógv síðstu áleið 3 árini (sí til dømis mynd 10).

Løntakaratalið í byggivinnuni er nú um 2.300 fólk, sum er um 100 fólk fleiri sammett við miðskeiðis í 2008, tá ið sera nógv virksemi eisini var í byggivinnuni. Sambært konjunkturbarometrinum, sum Hagstovuni ger upp, sigur bróðurparturin av fyritøkunum í byggivinnuni frá, at trot á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri at vaksa meira um framleiðsluna.

Í summum vinnugreinum, millum annað í byggivinnuni, innflyta fyritøkur arbeiðsmegi fyri at hava møguleika at nøkta eftirspurninginum og fyri ikki at missa marknaðarpartar. Fyri føroyska búskapin er gott, at fyritøkur kunnu fáa hendur á arbeiðsmegi uttanífrá, tá ið tær hava tørv á hesum og tá ið torført er at fáa hendur á neyðugu arbeiðsmegini í landinum. Hetta tekur nakað av trýstinum av arbeiðsmarknaðinum, tá ið nógv virksemi er, og minkar um vandan fyri, at fløskuhálsar taka seg upp.

Tekin síggjast eisini um fløskuhálsar á bústaðarmarknaðurin í miðøkinum og í størri bygdunum. Bústaðarmarknaðurin er sjálvsagt trýstur av stóru tilflytingini, sum hevur verið síðani 2014. Hetta sæst millum annað aftur í stórum hækkingum í sethúsaprísum sambært uppgerðum hjá Betri Banka, sí mynd 3.

Stóru príshækkingarnar eru fyri tað nógva avmarkaðar til miðøkið í landinum, meðan príshækkingarnar ikki eru eins stórar aðrastaðni í landinum. Ein orsøk til trýstið sethúsamarknaðin er, at fáar bústaðareindir eru bygdar síðstu áleið 4 árini, hóast stór nettotilflyting hevur verið.

Skrásettar nýíbindingar í elkervið hjá SEV benda á, at síðan 2013 eru bygdar um 100 nýggjar bústaðareindir um alt landið árliga, sí mynd 2. Nakað fleiri eindir eru helst bygdar í 2017 og aftur 2018, helst um 150-200 bústaðareindir. Tølini fevna um sethús, raðhús og íbúðir.

150-200 nýggjar bústaðareindir eru ov fáar eindir til at nøkta tørvin á nýggjum bústøðum, tá ið nettotilflytingin til landið er 500-600 fólk, sum hon hevur verið síðstu tvey árini. Harafturat er neyðugt at byggja bústaðareindir, so hvørt sum verandi hópur av bústøðum eldist og verður ótíðarhóskandi.

**Mynd 2**
**Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í kervið hjá SEV, 1998-2017**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í kervið hjá SEV um alt landið. Tølini fevna um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

Í løtuni veksur fólkatalið í landinum umleið 850 fólk um árið, sum svarar til 1,5-2% um árið. Nettotilflytingin er um 600 fólk um árið. Við verandi fólkavøkstri kann tørvurin á nýggjum bústøðum í landinum metast til í minsta lagi um 300-500 bústaðareindir um árið. Nógv bendir á (sí millum annað mynd 2), at sammett við tørvin, verða framvegis bygdir ov fáir nýggir bústaðir.

Harafturat sæst ein gongd í øllum londunum í Vesturheiminum, har ið færri fólk vera fyri hvørt húski. Hetta fer væntandi at gera tørvin á nýggjum og serliga smærri bústøðum størri næstu mongu árini.

Ein orsøk til, at lutfalsliga fáar bústaðareindir eru bygdar síðstu árini er, at somikið nógv av øðrum byggivirksemi hevur verið í landinum, almennar byggiverkætlanir, virkisbygningar og líknandi, at byggifyritøkur hava ikki havt møguleika ella tøka arbeiðsorku at fara undir aðrar verkætlanir, harundir bygging av vanligum sethúsum, íbúðum og øðrum bústøðum.

Felagið Bústaðir roknar leysliga við at taka 150 til 200 nýggjar bústaðareindir í nýtslu seinni í ár og næsta ár tilsamans. Eftir verandi leisti kann Bústaðir byggja um 100 nýggjar bústaðir um árið, og Bústaðir hevur í løtuni um 300 bústaðir ávegis í sínum byggiætlanum, sum væntandi fer at taka nakað av trýstinum av bústaðarmarknaðinum.

**Mynd 3**
**Sethúsaprísir, indeks 1998 = 100, 1998 til 2018**




Viðm.: Sethúsaprísir eru úr uppgerðini hjá Betri Banka. Sethúsaprísir fyri 2018 eru fyri fyrsta ársfjórðing 2018. Onnur tøl eru ársmiðal. Tølini eru í ársins prísum og leggja ikki upp fyri prís- og lønarvøkstri í tíðarskeiðnum.
Kelda: Hagstovan og Betri Banki.

Mynd 3 omanfyri vísir gongdina í sethúsaprísum í landinum síðani 1998. Ymiskar orsøkir kunnu vera til, at sethúsaprísir hækka. Høvuðsorsøkin er helst, at inntøkurnar í samfelagnum støðugt hækka og at fólk soleiðis fáa meira av tiltøkupeningi og kunnu taka størri lán, umframt metlágt rentustøði. Ein onnur orsøk er fólkavøksturin og fólkatilflytingin, sum hevur verið síðstu árini og at ikki hevur verið bygt samsvarandi av nýggjum bústøðum síðstu árini.

Á mynd 3 síggjast tekin um, at bústaðarmarknaðurin er trýstur síðstu umleið tvey árini av tí fólkatilflyting, sum hevur verið til landið, og at sethúsaprísir eru hækkaðir munandi síðstu tvey árini. Myndin vísir eisini, at hetta trýst sæst bæði í miðstaðarøkinum og aðrastaðni kring landið.

*Til ber ikki at staðfesta ovhiting í búskapinum, hóast tekin síggjast um fløskuhálsar*

Hóast stóran búskaparvøkstur síðstu árini, metir Fíggjarmálaráðið ikki, at til ber at staðfesta, at føroyski búskapurin sum heild er ovhitaður ella at verandi gongd ikki er haldfør. Til tílíkar staðfestingar krevjast hagtøl og vitan um búskapin, sum ikki eru tøk, til dømis uppgerðir av tjóðarroknskapinum í føstum prísum, sum vit ongantíð hava havt í Føroyum.

Trupulleikarnir av fløskuhálsum, sum síggjast í løtuni, tykjast vera avmarkaðir til ávísar vinnugreinar og møguliga til ávís øki í landinum heldur enn at ávirka allan búskapin sum heild. Sambært Hagstovuni veksur innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtsla í løtuni um 4% árliga, sum ikki er serstakliga stórur vøkstur, um vit sammeta við til dømis árini 2006 ella 2007, tá ið nógv ferð eisini var á búskapinum.

**Mynd 4**

**Inn- og útlán til húsarhald í Føroyum, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept.-2013 til juli-2018**




* Nettoinnlán í mynd B er munurin millum inn- og útlán í mynd A.
Kelda: Hagstovan.

Ógvusligur útlánsvøkstur sæst heldur ikki í landinum, sí mynd 4. Bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum eru vaksin um 3% og um 4% til vinnukundar síðsta árið. Útlán úr føroyskum peningastovnum til føroyskar vinnukundar eru vaksin úr 5 til 5,3 mia. kr. síðani ársbyrjan 2014, meðan útlán úr føroyskum peningastovnum til føroysk húsarhald eru vaksin úr 7,3 til 8,6 mia. kr. sama tíðarskeið.

Gongdin í útlánum til húsarhald og vinnukundar ikki fyri, at talan er um lánifíggjaðan vøkstur, sum vit sóu árini frammanundan fíggjarkreppuna, sum byrjaði í 2008. Heldur verandi gongd fram í fleiri ár, er kortini vandi fyri, at stórar kostnaðar- og lønarhækkingar kunnu koma fyri í ávísum vinnugreinum og á ávísum marknaðum, sum síðani kunnu spjaða seg til aðrar partar av búskapinum.

Skuldin hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki vaksin serstakliga nógv síðstu árini. Innlán hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum eru eisini vaksin meira enn útlánini síðstu tvey árini. Gongdin í inn- og útlánum úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum sæst í mynd 4. Realkredittlán, sum føroysk húsarhald taka úr donskum realkredittfeløgum, eru minkað nakað

síðstu árini, sí eisini mynd 4. Minkingin er helst millum annað komin av, at sethúsalánini úr føroyskum peningastovnum er kappingarfør við realkredittfíggingina.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg sammett við privata skuld í øðrum londum í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá føroyskum húsarhaldum kann metast til umleið 55% av BTÚ. Bruttoskuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis væl omanfyri 100% av BTÚ, meðan skuldin hjá húsarhaldum í Íslandi er 75-80% av BTÚ.

Samanumtikið bendir nógv á, at framgongdin í búskapinum síðstu árini hevur verið haldfør, og at hon hevur verið grundað á vaksandi framleiðslu og hækkandi inntøkur heldur enn at vera lánifíggjað framgongd.

*Gongdin er framvegis góð í alivinnuni hóast nakað minni tøku í 2018*

Mynd 5 vísir gongdina í alivinnuni síðstu árini. Á myndini sæst tøkan av alifiski í kruvdari vekt. Tøkan av alifiski er vaksin úr um 40 tús. tons í 2009 til um 70 tús. tons í 2018 (í kruvdari vekt), ein vøkstur á um 75%. Sama tíðarskeið er útflutningsvirðið av alifiski vaksið úr um 1,2 mia. kr. til út við 3,9 mia. kr., ein vøkstur á 225% Av hesum sæst, at framgongdin fyri ein stóran part kemur av serstakliga góðari prísgongd.

**Mynd 5**
**Tøka av aldum laksi og sílum, skift á ár, 1996 til 2019**




Viðm.: Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum.
* Tøkan í 2018 er mett grundað á fiskagoymsluna primo mars 2018 og á støddarbýtið á fiskagoymslu. Talið fyri 2019 er mett leysliga og skal lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og Sp/F Avrik v. Rúna Dam.

Prísirnir á aldum laksi hava verið sera høgir í nøkur ár. Prísirnir á aldum laksi hækkaðu serliga í 2013, og hækkaðu aftur eitt vet í 2014 og 2015. Higartil í ár hava prísirnir á aldum laksi í miðal verið á at kalla sama stigi sum í 2017, hóast prísirnir vóru nakað lægri við ársbyrjan.

Góða prísgongdin síðstu árini hevur havt við sær, at miðalprísurin á útfluttum aldum laksi úr Føroyum er hækkaður úr um 31 kr./kg. í 2012 til um 58 kr. kg. fyrra hálvár 2018. Torført er sjálvsagt at meta um, hvussu prísirnir á aldum laksi vera frameftir, men fleiri eygleiðarar rokna við príslækking seinni í ár, tá ið roknast kann við størri útboði av laksi.

Útflutningsvinnurnar og útlendis eftirspurningurin hava givið stórt ískoyti til búskaparvøksturin síðstu árini. Roknast kann við, at hetta fer at broytast nakað í ár og næstu 1-2 árini. Millum annað er sannlíkt, at fleiri av føroysku kvotunum á fjarleiðum minka næstu 1-2 árini, umframt at tøkan av alifiski væntandi ikki veksur stórvegis aftur næstu 1-2 árini. Tí kann roknast við, at innlendis eftirspurningurin (húsarhaldsnýtsla, íløguvirksemi, almenn nýtsla og tílíkt) í størri mun enn útlendis eftirspurningur fara at stimbra undir vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni næstu 1-2 árini.

Føroysku alifyritøkurnar hava síðstu árini gjørt stórar íløgur í smoltstøðirnar á landi. Íløgurnar fara væntandi at hava við sær, at miðalstøddin á útsettum smoltum fer at vaksa úr 200-300g til góð 500g innanfyri 2-3 ár. Hetta fer síðani væntandi at hava við sær, at til ber at stytta framleiðslutíðina í sjónum úr góðum 16 til góðar 12 mánaðir.

Roknast kann tí við, at samlaða framleiðsluorkan í landinum av aldum laksi kann hækka um 20-25% næstu 3-4 árini, av tí at meira kann setast út av fiski, tá ið framleiðslutíðin á sjónum verður stytri. Hetta fer sannlíkt at hava við sær, at samlaða framleiðslan (tøkan) kann hækka úr verandi um 80 tús. tonsum í kruvdari vekt til út við 100 tús. tons í kruvdari vekt næstu 2-4 árini. Hetta fer væntandi at geva eitt ískoyti til vøksturin í búskapinum næstu 3-4 árini.

*Tekin síggjast um frægari útlit fyri fiskiskapin eftir botnfiski*

Avreiðingar av botnfiski fiskaður undir Føroyum eru framvegis søguliga smáar, sí mynd 6. Fyri fyrstu ferð í fleiri ár tykjast útlitini fyri toska- og hýsustovnin á landgrunninum nú at vera batnandi. Enn ber kortini ikki til at siga við vissu, at fiskiskapurin fer at batna næstu 1-2 árini. Higartil í ár eru avreidd um 25% meira av toski í nøgd um avreiðingarskipanina sammett við í fjør.

**Mynd 6**

**Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, býtt á ársfjórðingar, tús. tons, 1993Q1 til 2018Q2**




* Tølini vísa veiðina, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í avreiddari vekt. Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum á føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í Íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap. Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.

Kelda: Hagstovan.

Sambært Havstovuni benda yvirlitstrolingar á landgrunninum á, at toska- og hýsustovnurin eru við at koma fyri seg. Á mynd 6 sæst, at avreiðingarnar av botnfiski um avreiðingarskipanina síðstu 4-5

árini hava verið lægri enn kreppuárini í 1990'unum. Við í mynd 6 verða eisini taldar avreiðingar av fiski fiskaður á Flemish Cap og undir Íslandi. Umstøðurnar eru framvegis torførar innan fiskiveiðuna á heimligu leiðunum og atknýttu fiskavirkisvinnuna á landi.

Roknast kann við, at fiskiskapurin eftir botnfiski á fjarleiðum, serstakliga í Barentshavinum og á Flemish Cap, fer at geva minni ískoyti til búskaparvøksturin næstu 1-2 árini sammett við árini frammanundan. Føroysku toskakvoturnar í Barentshavinum fara sannlíkt at minka nakað næsta ár.

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Føroyski arbeiðsmarknaðurin tykist framvegis at vera sera væl fyri. Skrásetta arbeiðsloysið í landinum var 1,7% í juli, sum er sera lágt. Talið av løntakarum hevur sett nýggj met síðstu mánaðirnar og er nú omanfyri 27 tús. fyri fyrstu ferð. Arbeiðsloysið er lækkað støðugt úr um 7,5% tíðliga í 2011 til 1,7% í juli 2018. Á mynd 7 niðanfyri sæst gongdin í arbeiðsloysinum og løntakaratalinum.

**Mynd 7**

**Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan.-2005 til juli-2018**




Kelda: Hagstovan.

Arbeiðsloysið í er lágt í øllum landinum uttan í Suðuroynni, har arbeiðsloysið er 4-5% sammett við 1-2% aðrastaðni í landinum. Síðsta árið ella so er arbeiðsloysið vorðið meiri ójavnt býtt kring landið. Arbeiðsloysið í Suðuroynni er ikki minkað eins nógv síðstu 1-2 árini sum aðrastaðni í landinum. Hetta kemur sjálvsagt fyri ein stóran part av eldsbrunanum á Tvøroyri í juni 2017, sum hevði við sær, at eitt stórt arbeiðspláss læt aftur.

Roknast kann við, at arbeiðsloysið í Suðuroynni aftur fer at minka næstu tíðina, nú tá ið virksemið verður aftur á virkinum og tá ið tað fer at taka ímóti fiski. Talið av løntakarum hækkar um 3% árliga í løtuni og er nú fyri fyrstu ferð omanfyri 27 tús., sí mynd 7. Talva 1 vísir løntakarar í juni síðani 2015 eftir høvuðsvinnugreinum.

**Talva 1**
**Løntakarar í juni eftir vinnubólkum, 2015-2018, fólk í tali**

| Vinnubólkur | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Munur 2017-18 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.050 | 4.036 | 4.195 | 4.168 | -27 | -0,6 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.427 | 3.669 | 3.894 | 4.185 | 291 | 7,5 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.384 | 8.580 | 8.761 | 9.105 | 344 | 3,9 |
| Almenn o.o. tænasta | 9.092 | 9.270 | 9.398 | 9.608 | 210 | 2,2 |
| **Løntakarar tilsamans** | **24.953** | **25.555** | **26.248** | **27.066** | **818** | **3,1** |

Kelda: Hagstovan.

Talið á løntakarum er serstakliga vaksið í byggivinnuni síðsta árið, og talið á løntakarum er eisini vaksið nógv í privatum tænastuvinnum. Innan almennar tænastur og líknandi hevur vøksturin verið nakað minni.

**Mynd 8**
**Lønargjaldingar árstíðarjavnaðar, býttar á ársfjórðingar, 1. ársfjórðing 1985 til 2. ársfjórðing 2018**




Viðm.: Mynd A vísir árstíðarjavnaðar lønargjaldingar tilsamans 1. ársfjórðing 1985 til 2. ársfjórðing 2018.
Mynd B vísir árstíðarjavnaðar lønargjaldingar í fýra høvuðsvinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 2. ársfjórðing 2018.
Kelda: Hagstovan.

Lønargjaldingar í Føroyum vaksa í løtuni omanfyri 5% árliga, sí talvu 2. Lønargjaldingar tilsamans og í ymiskum høvuðsvinnugreinum síggjast eisini í mynd 8. Vøksturin í lønargjaldingum tók dik á seg miðskeiðis í 2013 og hevur staðið við síðani. Vøksturin hevur verið stórur innan allar teir fýra høvuðsvinnubólkarnar, sum síggjast høgrumegin í mynd 8. Innan privatar og almennar tænastuvinnur hevur verið javnur og støðugur vøkstur síðani 2013.

**Talva 2**
**Lønargjaldingar eftir høvuðsvinnugreinum, januar-august, 2015-2018, mió. kr.**

| Vinnugrein | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Munur 2017-18 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.000 | 1.109 | 1.180 | 1.180 | 0 | 0,0 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 655 | 718 | 806 | 939 | 133 | 16,5 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.656 | 1.746 | 1.853 | 1.950 | 97 | 5,2 |
| Almenn o.o. tænasta | 1.843 | 1.922 | 1.989 | 2.073 | 84 | 4,2 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **5.153** | **5.495** | **5.827** | **6.142** | **314** | **5,4** |

Kelda: Hagstovan.

*Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur*

Hagtøl benda á, at húsarhaldsnýtslan í Føroyum vaks lítið árini eftir fíggjarkreppuna og fram til 2013. Húsarhaldsnýtslan er síðani vaksin skjótari síðan 2013. Inntøkurnar hjá landinum frá meirvirðisgjaldinum benda eisini á, at húsarhaldsnýtslan er vaksin bæði í 2017 og aftur í ár, tó at vøksturin tykist vera hæsaður nakað av í ár. Innflutningurin av nýtsluvørum bendir eisini á, at húsarhaldsnýtslan er vaksin javnt síðstu umleið trý árini.

**Mynd 9**
**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan.-1998 til aug.-2018**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 9 vísir innflutning av ymiskum nýtsluvørum býtt á ódrúgvar nýtsluvørur og hálvdrúgvar og drúgvar nýtsluvørur íroknað innflutning av akførum. Ódrúgvar nýtsluvørur fevna um mat-, drykkjuvørur og klædnavørur. Drúgvar og hálvdrúgvar nýtsluvørur fevna um akfør, elektronikk, hvítvørur og líknandi. Myndin vísir, at javnur vøkstur hevur verið í innflutninginum av vørum

síðan 2013. Hetta er tekin um, at nýtsla og eftirspurningur eru vaksin og at tey framvegis eru vaksandi.

**Mynd 10**
**Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 2. ársfjórðing 2018, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

Brúkaraprístalið er hækkað spakuliga síðani fyrsta ársfjórðing 2016, og prístalið er hækkað um 2% síðsta árið ella so, sí mynd 10. Frammanundan hevur samlaða brúkaraprístalið verið rættiliga støðugt síðani miðskeiðis í 2008, tá ið fíggjar- og búskaparkreppan byrjaði. Ein høvuðsorsøk til hækkandi prístalið síðstu tvey árini er, at oljuprísir eru støðugt hækkaðir hetta tíðarskeiðið.

Rentustøðið er framvegis sera lágt, millum annað orsakað av harðari kapping millum peningastovnar og sera lágum altjóða rentustøði. Lækkandi rentustøðið síðani fíggjar- og búskaparkreppuna hevur eisini verið ein orsøk til, at prístalið ikki er hækkað stórvegis síðani 2009. Aðrar orsøkir eru, at privati eftirspurningurin var heldur lágur og vaks lítið árini eftir kreppuna í 2009. Harafturat kemur ógvusliga fallið, sum var í oljuprísum í 2014 og 2015.

**Mynd 11**
**Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan.-2006 til juni-2018**




Kelda: Hagstovan.

Konjunkturvísitalið er ikki broytt stórvegis síðstu árini, sí mynd 11. Afturvendandi sveiggj hava verið í vísitalinum, men samanumtikið er vísitalið ikki nógv broytt síðstu 5-6 árini. Samlaða

vísitalið hækkaði eftir kreppuna í 2008 og 2009. Vísitalið fyri húsarhald hevur eisini verið hampiliga støðugt síðstu nógvu árini og serliga eftir fíggjarkreppuna, sí mynd 11.

Vísitalið vísir í stuttum, at vinnuvirki og húsarhald framvegis eru bjartskygd um framtíðina. Tó lækkaði samlaða vísitalið nakað frá januar til juni í ár, sí mynd 11. Flestu húsarhald rokna við, at búskaparstøðan verður at kalla óbroytt næsta árið og at arbeiðsloysið eisini verður óbroytt næsta árið. Vinnuvirki rokna sum heild við hækkandi eftirspurningi, og serliga fyritøkur í byggivinnuni lata væl at útlitunum fyri næsta árið. Samlaða konjunkturvísitalið kvinkaði niður til 25 úr 26 síðsta hálva árið.

*Gongdin í fólkatalinum*

Hagtølini, sum verða nýtt niðanfyri í sambandi við fólkatal og -flytingar stava frá landsfólkayvirlitinum og Hagstovuni. Fólkatalið fevnir sostatt um øll, sum eru skrásett at búgva fast í landinum, harundir sjálvsagt eisini tilflytarar, sum flyta til landið og fáa fastan bústað her.

**Mynd 12**
**Fólkatal í Føroyum 1. januar, 1985-2018, meting fyri 2019**




Kelda: Hagstovan.

Vøksturin í fólkatalinum síðan 2014 er tekin um ta framgongdina, sum hevur verið í búskapinum og á arbeiðsmarknaðinum. Vanliga samsvara broytingar í fólkaflytingini til og úr landinum væl við umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum sum heild. Tvær orsøkir til góðu gongdina í fólkatalinum eru óivað, at fleiri nýggj størv hava tikið seg upp, og at til ber at taka fleiri útbúgvingar, sum ikki hava verið gjørligar at taka áður.

Fráflytingin er minkað støðugt síðani tíðliga í 2013. Sambært Hagstovuni hevur fráflytingin í mun til fólkatalið ikki verið lægri enn nú, síðani regluligar skrásetingar byrjaðu í 1970'unum. Størsta orsøkin til, at fólkatalið er vaksið síðstu 4-5 árini er, at fráflytingin er minkað munandi.

**Mynd 13**
**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2018**




* Tølini fyri árið 2018 eru metingar grundaðar á jan.-jul. 2018.
Kelda: Hagstovan.

Tilflytingin er eisini vaksin síðstu árini, men hon er ikki vaksin eins nógv, og fráflytingin er minkað. Sambært Hagstovuni er tilflytingin nú tann mesta, sum hevur verið síðani síðst í 1990'unum og um aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna tíðliga í 1990'unum. Samanlagda úrslitið av minni fráflyting og størri tilflyting er, at nettotilflytingin er vaksin í stórum og ongantíð hevur verið so stór sum nú, hvørki í tali ella lutfalsliga.

Fólkatalið er vaksið støðugt síðani 2013 og er nú omanfyri 51 tús. fólk, sum er tað hægsta, sum hevur verið skrásett, sí mynd 12. Hetta er fyrstu ferð síðani um aldaskiftið, at áhaldandi fólkavøkstur hevur verið í landinum fleiri ár á rað. Mynd 13 vísir árligar broytingar í fólkatalinum síðani 1970 við mettum tølum fyri 2018, og mynd 14 vísir nettoflyting til landið býtt á mánaðir.

**Mynd 14**
**Fráflyting og tilflyting til Føroyar og nettoflyting*, jan.-2007 til juli-2018**




* Strikan við nettoflyting vísir nettoflyting samanlagt fyri síðstu 12 mánaðirnar fyri hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Fólkavøksturin, sum hevur verið síðani 2013, hevur kortini ikki verið eins stórur kring landið. Fólkatalið í á Sandoynni og í Suðuroy er heldur kvinkað niðureftir síðani 2014, meðan allur fólkavøksturin hevur verið aðrastaðni í landinum. Sandoyggin og Suðuroyggin hava sostatt ikki merkt nakað til fólkavøksturin, sum hevur verið í landinum síðani 2014. Síðsta árið er fólkatalið vaksið mest í Eysturoynni og í miðstaðarøkinum. Síðan fólkavøksturin tók dik á seg í 2013, er fólkatalið vaksið mest í miðøkinum í landinum.

**Talva 3**
**Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. aug. 2017 til 1. aug. 2018**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. aug. 2017 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. aug. 2018 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 6.053 | 34 | 60 | 6.147 | 94 | 1,6 |
| Eysturoy | 11.207 | 78 | 172 | 11.457 | 250 | 2,2 |
| Tórshavnarøkið* | 19.330 | 111 | 291 | 19.732 | 402 | 2,1 |
| Streymoyggin annars | 4.691 | 33 | 44 | 4.768 | 77 | 1,6 |
| Vágoy | 3.216 | 20 | 40 | 3.276 | 60 | 1,9 |
| Sandoy | 1.281 | -8 | -2 | 1.271 | -10 | -0,8 |
| Suðuroy | 4.631 | -22 | -2 | 4.607 | -24 | -0,5 |
| **Alt landið** | **50.409** | **246** | **603** | **51.258** | **849** | **1,7** |

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

Munurin, sum sæst í til- og fráflytingini millum økini, er tekin um, at øll økini í landinum hava ikki fingið sama lut í framgongdini í búskapinum síðstu árini sí talvu 3. Gongdin er eisini tekin um, at umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum ikki eru eins góðar í øllum økjum í landinum.

Gongdin í fólkatalinum síðstu árini hevur havt við sær, at haldførið í búskapinum er batnað munandi. Heldur verandi gongd fram við nettotilflyting og hækkandi fólkatali, fer hetta at gera avbjóðingina at betra um langtíðarhaldførið í búskapinum lættari at loysa.

*Viðurskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni*

Á mynd 15 sæst gongdin í føroyska inn- og útflutninginum síðan 1988 við mettum tølum fyri 2018. Myndin vísir sum heild, at innflutningurin verður ávirkaður av búskaparligu konjunkturunum í samfelagnum og serliga av innlendis eftirspurninginum. Harafturat ávirka oljuprísir innflutningin í stóran mun. Stórur innflutningur av skipum og flogførum ella stórar íløgur okkurt ár kunnu eisini ávirka innflutningin.

Útflutningurin er vaksin meiri støðugt síðstu árini, sammett við vøksturin í innflutninginum. Útflutningurin er síðani 2009 vaksin úr um 4 mia. kr. til út við 9 mia. kr. í 2017. Útflutningurin

minkar væntandi um 10% í 2018 orsakað av minni tøku av aldum laksi og smærri føroyskum kvotum á fjarleiðum.

**Mynd 15**
**Inn- og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2018**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki íroknaðar handilsjavnan.
* Talið fyri 2018 er meting bygd á fyrra hálvár 2018.
Kelda: Hagstovan.

Avlopið á handilsjavnanum í 2017 var um 1,5 mia. kr. Uppgerðir av inn- og útflutningi fyrra hálvár benda á, at avlopið á handilsjavnanum verður minni í ár sammett við í 2017. Orsøkin er, at útflutningurin minkar í ár, meðan innflutningurin er at kalla óbroyttur. Sannlíkt verður lítið avlop ella javnvág á handilsjavnanum í 2018, sí mynd 15.

**Mynd 16**
**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2018**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki íroknaðar handilsjavnan.
* Tølini fyri 2016 til 2018 eru leysligar metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Síðstu árini hava avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum tey flestu árini, sí mynd 16. Uppgerðir eru ikki tøkar fyri gjaldsjavnan árini eftir 2015, men við støði í handilsjavnanum ber til at meta leysliga um gjaldsjavnan frá 2016 til 2018, hóast metingarnar eru nakað óvissar og skulu skiljast við

fyrivarnum. At gjaldsjavnin er mettur at versna munandi í 2018 sammett við 2017 kemur av, at innflutningurin er mettur at vaksa um 5% (350-400 mió. kr.) og at útflutningurin er mettur at minka um 10% (800-900 mió. kr.).

Nógv bendir á, at lutfalsliga stór avlop vóru á gjaldsjavnanum frá 2013 til 2017. Heldur verandi gongd fram, verður sannlíkt eisini stórt avlop í ár. At gjaldsjavnin er batnaður somikið nógv síðan 2013 kemur fyri ein stóran part av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað munandi síðani 2013. Hetta merkir, at prísir á útfluttum vørum (serstakliga á aldum laksi og uppsjóvarfiski) eru hækkaðir meiri í miðal sammett við prísirnir á innfluttum vørum (til dømis prísirnir á brennievni).

**Mynd 17**

**Føroyski útflutningurin býttur á keyparalond og fiskasløg, mia. kr., 1993 til 2018**




* Mynd A vísir útflutningin til fimm tey størstu keyparalondini í 2017. Myndin vísir árini 2007 til 2017. %-parturin av føroyska útflutninginum tilsamans eftir keyparalandi í 2017 sæst í klombur í mynd A.

** Mynd B vísir føroyska útflutningin í virði býtt á fiskasløg fyri árini 1993 til 2018 í % av útflutningi tilsamans. Tølini fyri 2018 eru tøl fyri fyrra hálvár 2018.

Myndin vísir ikki avreiðingarvirði hjá føroyskum skipum. Orsøkin til at nøgdirnar av svartkjafti ikki eru størri í myndini, er at stórur partur av svartkjaftinum fer til fóður í sambandi við laksaframleiðslu og sæst tí ikki aftur sum beinleiðis útflutningur.

Kelda: Hagstovan.

Samansetingin av føroyska útflutninginum er munandi broytt síðstu árini, sí mynd 17. Størsti parturin av útflutninginum er nú aldur laksur og makrelur. Søguliga sæð hevur størsti parturin av útflutninginum verið toskur. Harafturat fer størsti parturin av útflutninginum nú til Russlands, sum vit ikki hava útflutt eins nógv til søguliga sæð. Í 2017 fóru tilsamans 29% av útflutninginum til Russlands.

*Heimsbúskapurin*

Óvissan um gongdina í heimsbúskapinum er vorðin størri síðstu mánaðirnar. Størstu óvissurnar eru, at enn er ógreitt, hvørjar avtalur verða gjørdar, áðrenn Bretland fer úr ES-samstarvinum næsta ár. Fleiri ósemjur eru framvegis millum ES og Bretland um, hvussu samstarvið skal vera millum ES og Bretland næstu árini.

Harafturat síggjast fleiri tekin um, at USA, Kina og ES eru tilreiðar at seta verju- og revsitoll á útvaldar innfluttar vørur fyri at verja innlendskar vørur fyri kapping uttanífrá. Fer henda gongdin at halda fram og taka dik á seg, kann roknast við lægri vøkstri í heimsbúskapinum næstu árini. Tey

handilstiltøk, sum eru sett í verk higartil í USA, Kina og ES, ávirka kortini bara ein lítlan part av samlaða handlinum av vørum og tænastum millum lond. Verða ikki fleiri tílík tiltøk sett í verk, verður ávirkanin á vøksturin í heimshandlinum tí væntandi avmarkað.

Í løtuni er ikki óhugsandi, at Bretland fer úr ES-samstarvinum uttan at hava gjørt handilsavtalu við ES ella aðrar avtalur um til dømis tollsamgongu. Fer Bretland úr ES uttan at hava gjørt tílíkar avtalur um búskaparligt samstarv frameftir, kann roknast við, at hetta fer at skala búskaparvøksturin í Bretlandi og í øllum ES næstu árini. Av tí at ES og Bretland eru týðandi føroyskir útflutningsmarknaðir, kann eisini roknast við, at hetta fer at ávirka føroyska búskapin.

**Talva 4**
**Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2015-2019 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 2,9 | 1,5 | 2,3 | 2,9 | 2,7 |
| Evruøkið | 2,1 | 1,8 | 2,4 | 2,2 | 1,9 |
| Bretland | 2,3 | 1,8 | 1,7 | 1,4 | 1,5 |
| Ídnaðarlond tilsamans | 2,3 | 1,7 | 2,4 | 2,4 | 2,2 |
| Russland | -2,5 | -0,2 | 1,5 | 1,7 | 1,5 |
| Menningarlond | 4,3 | 4,4 | 4,7 | 4,9 | 5,1 |
| Heimsbúskapurin | 3,5 | 3,2 | 3,7 | 3,9 | 3,9 |

*Uppgerðirnar eru metingar frá juli mánaði í ár og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 2. juli 2018.

Roknast kann við lægri búskaparvøkstri í Bretlandi næstu árini, millum annað orsakað av óvissuni, sum er íkomin, nú Bretland fer úr ES og orsakað av, at vinnufyritøkur hava hug at útseta íløgur. Miðbankin í Bretlandi roknar við, at búskapurin har verður ávirkaður næstu 1-2 av tilgongdini at fara úr ES. Millum annað er vandi fyri størri prísvøkstri, og av at hugurin at gera íløgur fer at minka.

Vøksturin í Evropa hevur verið nakað minni síðsta hálva árið enn áður væntað. Útlitini fyri flestu búskapirnar í Evropa eru kortini framvegis hampulig, men roknast kann við nakað lægri vøkstri í Bretlandi, sum væntandi fer úr ES-samstarvinum árini 2019 til 2021. Í talvu 4 omanfyri síggjast metingar frá IMF um væntaða vøksturin í heiminum næstu árini.

Ein onnur óvissa í sambandi við búskapargongdina í Evropa er politiska óvissan og óvissa um almennu skuldina í Italia. Gongdin á arbeiðsmarknaðunum er sum heild batnað í flestu londum í Evropa, og arbeiðsloysið er lækkandi. Húsarhaldsnýtsla og privatar íløgur vaksa somuleiðis spakuliga, sum hevur gjørt sítt til, at framgongd hevur verið í Evropa síðstu árini.

Síðsta hálva árið hevur vøksturin í USA verið størri, enn áður mett. Sambært metingum hjá IMF og OECD fer vøksturin í USA at taka dik á seg í ár og næsta ár. Vøksturin kemur millum annað av stimbrandi fíggjarpolitikki, vaksandi húsarhaldsnýtslu og av at arbeiðsmarknaðurin tykist vera væl fyri í løtuni. Arbeiðsloysið í USA er støðugt lækkað síðstu árini og er nú tað lægsta síðani umleið

1970. Heldur vøksturin og gongdin á arbeiðsmarknaðinum fram í USA, er ikki óhugsandi, at rentustøðið í USA kann hækka nakað skjótari, enn fólk flest rokna við. Tílíkar óvæntaðar rentuhækkingar í USA kunnu síðani ávirka allan heimsbúskapin, sum frálíður.

Síðstu um fýra árini hevur Russland verið tann marknaðurin, sum føroyskar fyritøkur hava útflutt mest til. Síðstu trý árini er um fjórðingurin av føroyska útflutninginum farin til Russlands. Í 2017 fóru út við 30% av føroyska útflutninginum til Russlands. Aðrir týðandi marknaðir fyri fyritøkur, sum útflyta fisk og aldan laks, eru Bretland, Danmark, Týskland, Kina og USA.

Rentustøðið í Vesturheiminum er framvegis sera lágt. Í løtuni eru útlit framvegis til sera lágt rentustøði næstu 1-2 árini, tó at rentustøðið sannlíkt fer at hækka nakað sammett við verandi støði. Miðbankin í USA hækkaði leiðandi renturnar eitt vet í juni í ár og hevur givið ábendingar um framhaldandi og stigvísar rentuhækkingar í 2018 og 2019. Sannlíkt verður ikki talan um stórar rentuhækkingar.

Miðbankin í Evropa hevur givið ábendingar um, at leiðandi renturnar sannlíkt verða óbroyttar til miðskeiðis næsta ár. Miðbankin í Evropa er eisini stigvíst byrjaður at minka um onnur stuðulstiltøk, ,sum bankin hevur staðið fyri í nøkur ár. Hetta merkir millum annað, at evropeiski miðbankin nú keypir minni nøgdir av ríkisskuldarbrøvum sammett við fyri nøkrum mánaðum síðani.

Orsakað av at eftirspurningurin er vaksin meira enn útboðið av olju, eru altjóða oljuprísir hækkaðir um 16% í ár. Órógvið í Venesuela og handilstiltøk, sum USA hevur sett í gildi móti Iran, hava gjørt sítt til, at útboðið ikki er vaksið í sama mun sum eftirspurningurin. Sambært framtíðarprísum (futures) roknar oljumarknaðurin sjálvur við, at oljuprísir fara at lækka nakað næstu 4-5 árini.

Ymiskt er sjálvsagt, hvussu hækkandi oljuprísir ávirka ymisk lond, alt eftir um talan er um oljuframleiðandi lond ella um innflytarar av olju. Fyri føroyska búskapin er kortini greitt, at hækka oljuprísir óvæntað nógv næstu árini, fer hetta at skala búskaparvøksturin og at dýrka um føroyska innflutningin næstu árini.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt at gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna sum heild síðstu árini. Hugt verður eisini stutt eftir skuldarstøðuni hjá landinum.

Mynd 18 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við mettum tølum fyri 2018 og tølum úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019. Á myndini sæst, at landið hevði hall øll árini frá 2008 til 2015, men at avlop síðani var á 158 mió. kr. í 2016.

Í 2017 var stórt avlop í landskassanum á 563 mió. kr., sum fyri ein part av óvanliga góðum inntøkum og av góðu gongdini í búskapinum yvirhøvur. Heldur verandi gongd fram, verður úrslitið hjá landskassanum sannlíkt 270-300 mió. kr. í ár. Fíggjarmálaráðið hevur fyribils mett avlopið til 276 mió. kr. í 2018.

Síðstu 4-5 árini hava inntøkurnar hjá landinum verið væl hægri enn upprunaligu mett í fíggjarlógunum, sum er komið av góðu búskapargongdini síðstu árini.

**Mynd 18**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2019**




Viðm.: Tølini fram til og við 2017 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2018 eru mett tøl. Tølini fyri 2019 eru úr uppskotinum til fíggjarlóg.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Á mynd 18 sæst, at útreiðslurnar hava verið meira støðugt vaksandi síðani 1997, meðan inntøkurnar eru vaksnar meira óstøðugt. Inntøkurnar hjá landinum fylgja í størri mun sveiggjunum í búskapinum, meðan útreiðslurnar vaksa meira javnt og óheft av gongdini í búskapinum annars. Síðstu fýra árini eru inntøkurnar hjá landinum vaksnar munandi skjótari sammett við útreiðslurnar. Hetta hevur havt við sær, at avlop eru aftur í landskassanum eftir eitt tíðarskeið á fleiri ár við hallum í landskassanum.

**Mynd 19**

**Langfreistaða skuld landskassans og innistandandi í Landsbankanum, mió. kr., 1997 til 2018**




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 19 vísir langfreistaðu skuld landskassans og innistandandi hjá landsstýrinum í Landsbankanum (gjaldførið). Langfreistaða skuldin er lánsbrævaskuld á 4,6 mia. kr. í juli 2018. Harafturat hevði landsstýrið eitt rentu- og avdráttarfrítt lán frá 1998 á 500 mió. kr. til danska statin, sum sambært avtalu við donsku stjórnina fall burtur í juni í ár.

Lánsbrævaskuldin hjá landinum vaks munandi frá 2007 til 2013 orsakað av, at stór hall vóru í landskassanum hesi árini. Frá 2013 til 2018 er lánsbrævaskuldin minkað nakað. Føroyski landskassin hevur lítla skuld sammett við fleiri onnur lond í Vesturheiminum.

Bruttoskuldin hjá landinum kann metast til um 25% av BTÚ í 2018. Harafturat hava kommunur 1,1 mia. kr. í bruttoskuld tilsamans, sum svarar til 5-6% av BTÚ í 2018. Almenna bruttoskuldin í londunum í ES er til sammetingar 80-85% av BTÚ í miðal, meðan hon er um 35% av BTÚ í Danmark og 35-40% av BTÚ í Íslandi.

Mynd 20 vísir nettoskuldina hjá landskassanum síðani 1997. Nettoskuldin er í hesum føri uppgjørd sum langfreistað skuld frádrigið gjaldføri (innistandandi í Landskassanum umframt innistandandi á bankakontum) hjá landinum. Á myndini sæst, at nettoskuldin hjá landinum er minkað munandi síðstu 3-4 árini.

**Mynd 20**

**Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri), mió. kr., 1997 til 2018**




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 21 vísir inntøkur, útreiðslur og úrslit (fíggjarkrav, netto) hjá tí almenna sum heild árini 1998 til 2017. Myndin er í % av BTÚ. Tað almenna sum heild fevnir um landið (landskassan), kommunurnar og sosialu grunnarnar (ALS, AMEG o.s.fr.).

**Mynd 21**

**Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2017**




Viðm.: BTÚ fyri árini 2016 og 2017 eru mett tøl.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 21 vísir, at úrslitini hjá tí almenna sum heild eru batnað munandi síðstu árini. Úrslitið hjá tí almenna sum heild er mett til um 5% av BTÚ í 2017 og helst áleið tað sama ella nakað minni í 2018. Í londunum í ES er til sammetingar hall hjá tí almenna sum heild á um 0,5% av BTÚ. Í Danmark hevur tað almenna sum heild somuleiðis hall á um 0,5% av BTÚ. Úrslitini hjá tí almenna í Føroyum hava tí verið góð síðstu árini sammett við flestu lond í Evropa.

**Mynd 22**

**Skattainntøkur tess almenna, mió. kr. og % av BTÚ, 1998 til 2017**




Kelda: Hagstovan.

Mynd 22 omanfyri vísir skattainntøkurnar tilsamans hjá tí almenna í mió. kr. og í % av BTÚ árini 1998 til 2017. Skattainntøkurnar tilsamans eru vaksnar sera nógv síðani 2014, meðan búskapurin eisini er vaksin nógv og góðar tíðir hava verið. Samlaða skattatrýstið í landinum (skattainntøkur tilsamans í % av BTÚ) er lækkað síðstu um 10 árini úr umleið 47% til umleið 42% av BTÚ. Skattainntøkurnar hjá tí almenna eru sostatt vaksnar minni enn búskapurin annars er vaksin hesi síðstu 10 árini.

Mynd 23 niðanfyri vísir inntøkur og útreiðslur hjá føroysku kommununum árini 1998 til 2017 í mió. kr. Myndin vísir eisini úrslitini hjá kommununum tilsamans (fíggjarkrav, netto). Á myndini sæst, at bæði inntøkur og útreiðslur eru vaksnar munandi síðstu árini. Stóra lopið, sum sæst í inntøkunum og útreiðslunum í 2015 er orsakað av, at kommunurnar yvirtóku ábyrgdina av eldraøkinum í 2015.

**Mynd 23**

**Inntøkur, útreiðslur og nettoúrslit hjá føroyskum kommunum, mió. kr., 1998 til 2017**




Kelda: Hagstovan.

Á myndini sæst eisini, at hóast útreiðslurnar hjá kommununum eru nógv vaksnar síðstu árini, eru inntøkurnar hjá kommununum vaksnar meira, og kommunurnar sum heild hava havt avlop síðstu fýra árini.

Næstu árini fara útreiðslurnar hjá landi og kommunum á millum annað heilsu- og almannaøkinum at vaksa munandi. Hetta kemur av broyttari aldurssamanseting, betri tøkni í heilsuverkinum og betri viðgerðarmøguleikum og fer at hava við sær stórt trýst næstu árini á útreiðslurnar hjá landi og kommunum, sum nú umsita eldraøkið.

Nevnt kann verða, at útreiðslurnar til heilsu- og almannamál í dag eru um 55% av rakstrar-útreiðslunum á fíggjarlógini hjá landinum. Parturin av rakstrarútreiðslunum til hesi málsøkini fer væntandi at hækka næstu árini orsakað av broyttari aldursamanseting.

*Sambærilig meting av rakstrarútreiðslum landskassans*

Torført er at sammeta játtanarroknskapir yvir fleiri ár. Í talvu 5 niðanfyri eru rakstrarútreiðslurnar rættaðar fyri ávísar játtanir, sum eru tiknar úr, sum annaðhvørt eru fluttar í annan geira ella fluttar til ella frá inntøkujáttanum.

**Talva 5**

**Rakstrarútreiðslur landskassans vístar sambæriligar[a] og eftir játtanarslagi, mió. kr., 2011 til 2019**

| *Mió. kr.* | R2011 | R2012 | R2013 | R2014 | R2015 | R2016 | R2017 | J2018[b] | FLU-2019[b] |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul | 156 | 133 | 142 | 143 | 159 | 165 | 217 | 196 | 211 |
| Lógarbundið | 1.241 | 1.267 | 1.289 | 1.304 | 1.350 | 1.352 | 1.376 | 1.417 | 1.448 |
| Rakstur | 2.526 | 2.549 | 2.593 | 2.659 | 2.705 | 2.844 | 2.934 | 3.100 | 3.176 |
| **Tilsamans** | **3.923** | **3.948** | **4.023** | **4.105** | **4.214** | **4.360** | **4.527** | **4.713** | **4.835** |
| *Vøkstur í %* | *0,6* | *0,6* | *1,9* | *2,0* | *2,7* | *3,4* | *3,8* | *4,1* | *2,6* |

(a) Rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum eru gjørdar sambæriligar yvir tíð við at rætta fyri hesi viðurskifti: eldraøkið, Eystur- og Sandoyartunlar, Talgildu Føroyar, FAS-skipanin, Barsilsskipanin og løgustuðul til kommunur og sjálvsognarstovnar.

(b) Tølini fyri 2018 og 2019 eru úr ávikavist játtanareftirliti fyri 2018 og úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Søguliga sæð hevur greitt samband og samanhangur verið millum vøksturin í framleiðsluni (til dømis mátað við BTÚ) og almennu útreiðslurnar. Verður sammett yvir tíð, til dømis frá 1998 og frameftir, sæst, at almennu útreiðslurnar og vøksturin í BTÚ hava lyndi at fylgjast. Lønarhækkingar á almenna arbeiðsmarknaðinum og fólkavøksturin í landinum hava sjálvsagt stóran týdning fyri gongdina í útreiðslunum hjá landinum, sí talvu 6.

**Talva 6**

**Lønarvøkstur á almenna arbeiðsmarknaðinum og fólkavøkstur í %, 2011 til 2018**

| *% um árið** | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønarhækkingar | 0,9 | 0,9 | 1,6 | 1,9 | 2,2 | 1,9 | 2,3 | 2,5* |
| Fólkavøkstur | -0,5 | -0,3 | 0,2 | 1,0 | 1,1 | 1,4 | 1,4 | 1,7** |

*Lønarhækkingarnar fyri 2018 eru vístar fram til 1. oktober 2018.

**Fólkavøksturin var 1,7% tíðarskeiðið 1. aug. 2017 til 1. aug. 2018, sí talvu 3.

Kelda: Fíggjarmálaráðið og Hagstovan.

*Metingar av bygnaðarliga úrslitinum hjá tí almenna*

Tað almenna sum heild hevði avlop á um 5% av BTÚ í 2017, ella omanfyri 900 mió. kr., sí mynd 21. Metingar hjá Fíggjarmálaráðnum av bygnaðarliga úrslitinum hjá tí almenna sum heild vísa, at bygnaðarliga avlopið í 2017 helst var 2,5-3% av BTÚ, ella um 450-550 mió. kr.

Metingarnar av bygnaðarliga úrslitinum fevna um allan almenna geiran sum heild, tað er land, kommunur og sosialar grunnar. Almenn partafeløg, til dømis Føroyar Tele, Posta, Atlantic Airways ella ognarluturin í BankNordik, eru ikki við í metingunum.

Bygnaðarliga avlopið er ein leyslig meting av, hvussu úrslitið hjá tí almenna tilsamans hevði verið, um búskaparligu tíðirnar vóru sum í einum miðalgóðum ári (normalkonjunkturur); tað er, um

hvørki há- ella lágkonjunkturur var í einum ávísum ári. Metingarnar eru serstakliga óvissar og eru grundaðar á ávísar fortreytir, sum eisini eru óvissar.

Metingarnar benda á, at tað almenna sannlíkt eisini hevur bygnaðarligt avlop í 2018, og at avlopið helst verður á leið tað sama ella heldur minni enn í 2017. Fíggjarmálaráðið metir, at við verandi uppskoti til fíggjarlóg og verandi búskapargongd verður bygnaðarliga avlopið hjá tí almenna á um 2-2,5% av BTÚ í 2019.

*Landið hevur framvegis sera gott kredittvirði*

Av myndunum 18 til 23 sæst, at fíggjarstøðan hjá landinum og tí almenna sum heild er sera góð. Landið og tað almenna sum heild hava havt avlop síðstu árini, og hvørki land ella kommunurnar hava nógva skuld. Harafturat eru almennu skattainntøkurnar nógv vaksnar síðstu árini. Kredittvirðið hjá tí almenna í Føroyum er tí framvegis sera gott, eins og tað hevur verið síðstu árini.

Kredittmetingarfyrtøkan Moody's endurtók skuldarmetingina (ratingina) av lánførinum hjá landsstýrinum í februar 2018. Skuldarmetingin frá Moody's er framvegis Aa3, og útlitini fyri skuldarmetingina eru støðug. Skuldarmetingin Aa3 er fjórðhægsta meting, sum Moody's letur. Til sammetingar kann verða nevnt, at Belgia hevur somu skuldarmeting sum Føroyar. Metingarfyritøkan hevur tikið lántøkuna í sambandi við stóru tunnilsverkætlanirnar, Eysturoyar- og Sandoyartunlar, við í sínar metingar.

Einki av lánsbrøvunum hjá landsstýrinum skuldi afturrindast í 2018. Tí hevur ikki verið neyðugt hjá landsstýrinum at taka nakað nýtt lánsbrævalán í ár. Landsstýrið ætlar at rinda niður munandi part av lánsbrævaskuldini á umleið 1,1 mia. kr., sum skal endurnýggjast næsta ár. Hvussu nógv verður rindað niður er nakað treytað av, hvussu endaliga úrslitið í 2018 og fyrra hálvár 2019 verður.

Á sumri í 2017 tók landsstýrið tvey ymisk lánsbrævalán á tilsamans um eina mia. kr. Rentan á báðum lánunum var søguliga lág, og gildistíðin á lánunum var til 2023 og 2032. Lánini vórðu brúkt til at endurfíggja lán, sum fullu til gjaldingar á sumri 2017.

Annað av lánunum, sum landsstýrið tók í 2017, var sostatt eitt lán við gildistíð á 15 ár, sum er longri gildistíð, enn lánini vanliga og áður hava verið. Umfíggingin til lánið við longri gildistíð var liður í at tryggja landinum betri og støðugari skuldurmetingar. Lántøkan við longri gildistíð hevur við sær, at vandin fyri ógvusligum hækkingum í rentuútreiðslunum hjá landinum minkar.

Miðalgjaldførið hjá landinum er í løtuni um 3,4 mia. kr., sum er væl omanfyri minstagjaldførið í 2018 á um 2,7 mia. kr.

## Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2019

Talvan niðanfyri vísir inntøkur, útreiðslur og RLÚ-úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019. Í talvuni niðanfyri eru nettorentuútreiðslur (um 5 mió. kr.) íroknaðar á inntøkusíðuni, og løgujáttanir eru íroknaðar útreiðslunum tilsamans.

**Høvuðstøl í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019**

| *mió. kr.* | **2019** |
|---|---|
| Inntøkur tilsamans | 5.657 |
| Útreiðslur tilsamans | 5.254 |
| **RLÚ-úrslit** | **403** |

### Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkukeldurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, eru í 2019 framroknaðar við metta vøkstrinum í ársins prísum, sum er um 3% í 2019. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum.

### Játtanir innan løgur í 2019

Innan løgujáttanir eru hesar millum stóru játtanirnar í 2019:

- Útbygging av Landssjúkrahúsinum
- Nýggja havrannsóknarskipið
- Bygging og útvegan av bústovnum innan almannamál
- Umvæling av almennum bygningum
- Játtanin til tunlar og landsvegagerð
- Eykabátur til Strandferðsluna
- Játtanin til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar
- Talgildu Føroyar

Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru samanlagt 56 mió.kr. í 2019.

## Inntøkur landskassans í 2019

Inntøkurnar eru mettar til 5.657 mió. kr. netto í 2019 (íroknað mettar rentuútreiðslur á um 5 mió. kr. netto í 2019). Nettoinntøkur frá skattum eru mettar til 2.412 mió. kr. Avgjøld og tollur eru mett til 2.894 mió. kr. netto. Heildarveitingin verður 642 mió. kr.

Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019. Ávísar serstakar umstøður vóru í 2017, eitt nú 100 mió. kr. í vinningsbýti úr BankNordik, sum høvdu við sær munandi størri inntøkur frá skattum og avgjøldum sammett við metingarnar í fíggjarlógini fyri 2017.

**Meting av inntøkum landskassans í 2018 og 2019**

| *mió. kr.* | **R-2017** | **Meting 2018** | **FLU-2019** | **Munur M18 til FLU-19 (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Rentur | 5 | 7 | -5 | -171,4% |
| Skattainntøkur | 2.321 | 2.345 | 2.412 | 2,9% |
| Avgjøld og tollur | 2.663 | 2.749 | 2.894 | 5,3% |
| Ymsar inntøkur | 126 | 36 | 42 | 16,7% |
| Flytingar | -314 | -328 | -328 | 0,0% |
| Heildarveiting o.t. | 642 | 642 | 642 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **5.443** | **5.450** | **5.657** | **3,8%** |

## Útreiðslur landskassans í 2019

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur (netto) verða mettar til 5.254 mió. kr. í 2019. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 4.892 mió. kr., og løguútreiðslurnar eru 362 mió. kr., ikki íroknað játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru tilsamans 56 mió. kr. í 2019.

Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar hjá landskassanum útgreinaðar á rakstur og løgur.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2018 og 2019**

| *mió. kr.* | **R-2017** | **Meting 2018** | **FLU-2019** | **Munur M18 til FLU-19 (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Rakstur* | 4.577 | 4.768 | 4.892 | 2,6% |
| Løgur | 302 | 404 | 362** | -10,4% |
| **Tilsamans** | **4.879** | **5.172** | **5.254** | **1,6%** |

*Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru íroknaðar rakstur í hesi uppgerðini.
**Játtanin til løgur í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019 er 423,7 íroknað játtanirnar til Talgildu Føroyar, P/F Eystur- og Sandoyartunlar og stuðulsjáttanir til løgur fyri 5,5 mió. kr.

## Løgur í 2019

Løgukarmurin í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019 er um 424 mió. kr., íroknað játtanirnar til Talgildu Føroyar, felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar og stuðulsjáttanir til løgur fyri 5,5 mió. kr. Hesar játtanirnar eru bólkaðar undir rakstrarjáttanir í landsins játtanarskipan. Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru 56 mió. kr. tilsamans í 2019.

Óbrúktar løgujáttanir eru eisini frá 2018, sum hava átekning, og til ber tí at framflyta tær til fíggjarárið 2019. Roknast kann við, at um 50 mió. kr. av óbrúktum løgujáttanum kunnu flytast til fíggjarárið 2019. Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 424 mió. kr. í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019 er raðfestur.

| **Løguætlanin fyri 2019** ***(mió. kr.)*** | |
|---|---|
| | |
| **Løgur §1 - §17 tilsamans** | **423.700** |
| | |
| **§1 Løgtingið** | **0** |
| | |
| **§2 Løgmansfyrisitingin** | **2.000** |
| Umbygging í Tinganesi | 2.000 |
| | |
| **§3 Fíggjarmál** | **21.000** |
| Talgildu Føroyar | 21.000 |
| | |
| **§5 Fiskivinnumál** | **107.500** |
| Nýtt havrannsóknarskip | 107.500 |
| | |
| **§7 Mentamál** | **8.500** |
| Kirkjubømúrurin | 1.000 |
| Tjóðleikhús | 500 |
| Miðnám á Kambsdali | 1.500 |
| Húsarhaldsskúli í Klaksvík | 2.500 |
| Eftirskúli á Tvøroyri | 1.000 |
| Ítróttarháskúli í Vági | 1.000 |
| Listaskúli í Sandoynni | 1.000 |
| | |
| **§11 Heilsu- og innlendismál** | **107.500** |
| Medicoteknisk tól | 9.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 3.500 |
| Landssjúkrahúsið | 95.000 |
| | |
| **§12 Almannamál** | **43.000** |
| Bústovnar o.a., bygging ella útvegan | 41.000 |
| Dugni - skúlin | 2.000 |

| | |
|---|---|
| **§13 Uttanríkis- og vinnumál** | **1.000** |
| Sjóvinnustýrið, bygningur | 1.000 |

| | |
|---|---|
| **§17 Samferðslumál** | **133.200** |
| Umvæling av almennum bygningum | 21.000 |
| Almennir bygningar, søla | -18.000 |
| Nýggir tunlar og landsvegir | 49.200 |
| Havnir | 2.000 |
| Strandfaraskip Landsins – eykabátur og dokking av Smyrli | 44.000 |
| P/Eystur- og Sandoyartunlar | 35.000 |

| | |
|---|---|
| **Løgur §1 - §17 tilsamans** | **423.700** |

## Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2018

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst yvirlit yvir, hvørjar játtanir (høvuðskontur) verða mettar at fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið.

Her verða bæði tiknar við eykajáttanir og játtanir, har ið mett er, at frávik verður, tá ið fíggjarárið er av. Her eigur at verða nevnt, at samtykta fíggjarlógin fyri 2018 var ikki íroknað sáttmálaásettar lønarhækkingar á rakstrarjáttanum, tí sáttmálasamráðingarnar vóru ikki komnar á mál, tá ið fíggjarlógin varð samtykt. Eykajáttan á 69,8 mió. kr. varð samtykt í apríl 2018, sum veitti stovnum við rakstrarjáttanum eykajáttan til sáttmálaásettu lønarhækkingarnar.

**Meting av úrsliti landskassans í 2018 sammett við fíggjarlógina fyri 2018**

| *1.000 kr.* | **FL-2018*** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 5.424.640 | 5.449.770 | 25.130 | 0,5% |
| Rakstrarútreiðslur** | 4.659.474 | 4.769.698 | 110.074 | 2,3% |
| Løguútreiðslur | 364.000 | 404.102 | 40.102 | 11,0% |
| **RLÚ-úrslit** | **401.166** | **275.970** | **-125.196** | **-31,2%** |

* Samtykta fíggjarlógin fyri 2018 var uttan játtanina til sáttmálaásettar lønarhækkingar, sum var 69,8 mió. kr.
**Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru íroknaðar rakstur í hesi uppgerðini.

Talvan niðanfyri útgreinar frávikið í metta úrslitinum fyri 2018 sammett við upprunaligu fíggjarlógina.

**Lýsing av metta frávikinum í 2018 sammett við samtyktu fíggjarlógina**

| *mió. kr.* | **Frávik** |
|---|---|
| Eykajáttan til sáttmálaásettar lønarhækkingar | -70 |
| Aðrar eykajáttanir, samtyktar og umbidnar | -32 |
| Onnur frávik | -2 |
| Brúk av støðlaðum løgujáttanum (netto) | -13 |
| Søla av almennum bygningum, minni inntøka | -17 |
| Umbiðin játtan til eykabát til Strandferðsluna | -16 |
| Meirinntøkur | 25 |
| **Frávik tilsamans** | **-125** |

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar 1 til 20 (vanligir postar). Fyri 2018 verður roknað við, at úrslitið (RLÚ-1) verður eitt avlop á um 276 mió. kr. Fleiri orsøkir eru til, at avlopið væntandi verður minni enn tær um 401 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2018.

Høvuðsorsøkin er, at eykajáttanir á góðar 100 mió. kr. eru samtyktar og umbidnar í fíggjarárinum, harav størsti parturin er til lønarhækkingar, sum eru úrslit av sáttmálasamráðingunum. Harafturat verður væntandi brúkt av framfluttum løgujáttanum fyri umleið 13 mió. kr. og søla av almennum bygningum gevur væntandi 17 mió. kr. minni enn ætlað. Inntøkurnar vera væntandi um 25 mió. kr.

hægri enn mettu inntøkurnar í fíggjarlógini. Tilsamans merkir hetta, at RLÚ-úrslitið væntandi verður um 125 mió. kr. verri sammett við úrslitið í samtyktu fíggjarlógini fyri 2018.

**Meting av inntøkum landskassans í 2018 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki**

| *1.000 kr.* | R-2017 | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -20.000 | -18.000 | -18.000 | 0 | 0,0% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 25.216 | 30.000 | 25.000 | -5.000 | -16,7% |
| Skattainntøkur | 2.320.756 | 2.321.340 | 2.344.620 | 23.280 | 1,0% |
| Avgjøld og tollur | 2.662.795 | 2.728.000 | 2.749.000 | 21.000 | 0,8% |
| Ymsar inntøkur | 126.450 | 47.500 | 35.500 | -12.000 | -25,3% |
| Flytingar | -314.455 | -326.000 | -328.150 | -2.150 | -0,7% |
| Heildarveiting o.t. | 641.800 | 641.800 | 641.800 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **5.442.562** | **5.424.640** | **5.449.770** | **25.130** | **0,5%** |

Eins og nevnt omanfyri, kann roknast við, at inntøkurnar vera um 25 mió. kr. hægri enn mettar, tá ið fíggjarlógin fyri 2018 varð samtykt. Frávikini eru innan inntøkur frá avgjøldum og tolli, sum sannlíkt vera um 21 mió. kr. hægri enn mettar. Skattainntøkurnar vera væntandi um 23 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógini. Hinvegin eru rentuinntøkur og ymsar inntøkur nakað lægri enn mettar í fíggjarlógini.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2018 sammett við fíggjarlógina eftir játtanarslagi**

| *1.000 kr.* | FL-2018* | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 235.124 | 233.374 | -1.750 | -0,7% |
| Rakstrarjáttan | 3.016.523 | 3.119.017 | 102.494 | 3,4% |
| Løgujáttan | 364.000 | 404.102 | 40.102 | 11,0% |
| Lógarbundin játtan | 1.407.827 | 1.417.307 | 9.480 | 0,7% |
| **Tilsamans** | **5.023.474** | **5.173.800** | **150.326** | **3,0%** |
| | | | | |
| Herav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 69.764 | 1,4% |

* Samtykta fíggjarlógin fyri 2018 var uttan játtanina til sáttmálaásettar lønarhækkingar, sum var 69,8 mió. kr.

Sammett við fíggjarlógina verður roknað við hægri nýtslu á rakstrarjáttanum fyri tilsamans um 102 mió. kr. Innan løgujáttanir verður frávikið væntandi um 40 mió. kr. Løgujáttanir á fíggjarlógini fyri 2018 vóru tilsamans 364 mió. kr. Harafturat eru løgujáttanir fyri tilsamans 62 mió. kr. fluttar frá eldri árum og roknað verður við eykajáttanum fyri tilsamans um 11 mió. kr. í fíggjarárinum. Metta nýtslan í 2018 av løgujáttanum verður væntandi góðar 404 mió. kr. tilsamans.

Frávikið innan rakstrarjáttanir hevur fyri stóran part samband við eykajáttanina á 69,8 mió. kr., sum varð samtykt í Løgtinginum í apríl í ár og sum veitti stovnum við rakstrarjáttanum eykajáttan til sáttmálaásettu lønarhækkingarnar. Tá fingu til dømis Trivnaðartænastan, fólkaskúlin, miðnám og Landssjúkrahúsið eykajáttanir til sáttmálaásettu lønarhækkingarnar. Frávikið innan lógarbundnar játtanir stavar serliga frá høvuðskontunum fyri sjúklingatrygging og dagpeningaskipanina.

## Meting av útreiðslum landskassans* í 2018 sammett við fíggjarlógina eftir grein

| *1.000 kr.* | | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 58.580 | 59.561 | -19 | 0,0% |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 39.810 | 40.687 | 877 | 2,2% |
| § 3 | Fíggjarmál | 328.451 | 339.277 | 10.826 | 3,3% |
| § 5 | Fiskivinnumál | 254.900 | 259.154 | 4.254 | 1,7% |
| § 7 | Mentamál | 1.161.383 | 1.201.209 | 39.826 | 3,4% |
| § 11 | Heilsu- og innlendismál | 1.234.398 | 1.280.710 | 46.312 | 3,8% |
| § 12 | Almannamál | 1.524.160 | 1.535.482 | 11.322 | 0,7% |
| § 13 | Uttanríkis- og vinnumál | 117.742 | 113.831 | -3.911 | -3,3% |
| § 17 | Samferðslumál | 304.050 | 344.889 | 40.839 | 13,4% |
| | Útreiðslur tilsamans | 5.023.474 | 5.173.800 | 150.326 | 3,0% |
| § 20 | Inntøkur | 5.424.640 | 5.449.770 | 25.130 | 0,5% |
| | **RLÚ-úrslit** | **401.166** | **275.970** | **-125.196** | **-31,2%** |

* Í talvuni eru vístar stuðulsjáttanir, rakstrarjáttanir, løgujáttanir og lógarbundnar játtanir tilsamans.

Frávikini eru nærri lýst í øðrum talvum. Av størru frávikum kunnu millum onnur nevnast, at á grein 11 Heilsu- og innlendismál eru eykajáttanir á tilsamans 34 mió. kr. umbiðnar til Landssjúkrahúsið, sum fyri ein stóran part koma av eykajáttan í apríl í ár til sáttmálaásettu lønarhækkingarnar.

Á grein 17 Samferðslumál koma frávikini serliga av eini eykajáttan innan løgujáttanir á 16 mió. kr. til eykabát til Strandferðsluna, umframt at nakað er brúkt av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum. Harafturat hevur sølan av almennum bygningum givið minni enn ætlað.

## Rakstrarútreiðslueftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum á landsstýrismannagreinunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri. Í staðin er serstakt løgujáttanareftirlit síðst í frágreiðingini eftir rakstrarútreiðslueftirlitið.

## § 1 Løgtingið

**Játtanarliga støðan í september 2018**

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 10.1.03. | Løgtingsarbeiði | Rakstrarjáttan | -269.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og mett frávik |
| 10.2.01. | Landsgrannskoðanin | Rakstrarjáttan | 160.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 10.2.07. | Løgtingsins umboðsmaður | Rakstrarjáttan | 90.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **19.000** | |

**Meting av útreiðslum á §1 í 2018 sammett við fíggjarlógina fyri 2018**

| *1.000 kr.* | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 51.380 | 51.361 | -19 | -0,0% |
| Lógarbundin játtan | 7.200 | 7.200 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **58.580** | **58.561** | **-19** | **0,2%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 981 | 1,7% |

# § 2 Løgmansfyrisitingin

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.02. | Løgmansskrivstovan | Rakstrarjáttan | 324.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 12.3.01. | Løgmaður og landsstýrið | Rakstrarjáttan | 211.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 14.1.04. | Føroya kærustovnur | Rakstrarjáttan | 297.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 14.2.02. | Dátueftirlitið | Rakstrarjáttan | 45.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **877.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 2 í 2018 sammett við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | **FL-2018** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 5.100 | 5.100 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 32.010 | 32.887 | 877 | 2,7% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **37.110** | **37.987** | **877** | **2,4%** |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 747 | 2,0% |

# § 3 Fíggjarmál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.03. | Fíggjarmálaráðið | Rakstrarjáttan | -29.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 11.1.36. | Sáttmálaviðurskifti | Rakstrarjáttan | 600.000 | Fíggjarnevndarskjal í juni og eykajáttan umbiðin í sept. |
| 15.1.04. | TAKS | Rakstrarjáttan | 1.479.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 15.1.06. | Sakarmálskostnaður hjá TAKS | Rakstrarjáttan | 4.200.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| 15.1.07. | Føroya Gjaldstova | Rakstrarjáttan | 240.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og fíggjarnevndarskjal í juni |
| 15.2.01. | Hagstova Føroya | Rakstrarjáttan | 271.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 18.1.02. | Ymsar tænastumanna-eftirlønir | Lógarb. játtan | 3.550.000 | Mett frávik |
| 21.2.01. | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | Lógarb. játtan | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| 38.3.19. | KT Landsins | Rakstrarjáttan | 15.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **10.826.000** | |

## Meting av útreiðslum á §3 í 2018 samanborið við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 2.800 | 2.800 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 141.201 | 147.977 | 6.776 | 4,8% |
| Lógarbundin játtan | 184.450 | 188.500 | 4.050 | 2,2% |
| **Tilsamans** | **328.451** | **339.277** | **10.826** | **3,3%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 2.676 | 0,8% |

# § 5 Fiskivinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.05. | Fiskimálaráðið | Rakstrarjáttan | 782.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 31.1.06. | VØRN, Tilbúgving á sjógvi | Rakstrarjáttan | 236.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 31.1.06. | VØRN, Veðurtænastan | Rakstrarjáttan | -69.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 33.2.11. | Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving | Rakstrarjáttan | 441.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 33.2.03. | Búnaðarstovan | Rakstrarjáttan | 66.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 33.2.10. | Landbúnaðarstuðul | Stuðulsjáttan | -150.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 34.1.05. | Hvalagransking og hvalateljing | Rakstrarjáttan | 207.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 34.2.01. | VØRN, Fiskiveiðieftirlitið | Rakstrarjáttan | 841.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 34.3.01. | Havstovan | Rakstrarjáttan | 479.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 34.3.04. | Magnus Heinason | Rakstrarjáttan | 202.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 34.2.22. | Flutningsstuðul | Lógarb. játtan | -900.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| **Tilsamans** | | | **2.135.000** | |

## Meting av útreiðslum á §5 í 2018 sammett við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | **FL-2018** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 19.250 | 19.100 | -150 | -0,8% |
| Rakstrarjáttan | 146.350 | 149.535 | 3.185 | 2,2% |
| Lógarbundin játtan | 2.800 | 1.900 | -900 | -32,1% |
| **Tilsamans** | **168.400** | **170.535** | **2.135** | **1,3%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 2.255 | 1,3% |

# § 7 Mentamál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---:|---|
| 11.1.09 | Mentamálaráðið | Rakstrarjáttan | 747.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 23.1.04 | Studni | Rakstrarjáttan | 64.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.1.13 | Skúlabókagerð | Rakstrarjáttan | 10.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.1.18 | Nám | Rakstrarjáttan | 347.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.1.31 | Próvtøkur | Rakstrarjáttan | 239.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.2.01 | Fólkaskúlin | Rakstrarjáttan | 9.369.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.2.02 | Sernám | Rakstrarjáttan | 1.973.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 23.2.06 | Skúlatilboð til ung við breki | Rakstrarjáttan | 95.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.2.10 | Eftirskúlar | Stuðulsjáttan | -2.000.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| 23.3.05 | Miðnámsútbúgvingar | Rakstrarjáttan | 6.830.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og umbiðin í september |
| 23.3.11 | Ferðavinnuútbúgving | Rakstrarjáttan | 30.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.5.03 | Skúlatilboð innan vist og list á Sandoynni | Rakstrarjáttan | -2.200.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 23.5.07 | Frítíðarundirvísing | Rakstrarjáttan | 320.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 23.5.10 | Musikkskúlar | Rakstrarjáttan | 658.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.6.05 | Maritimir skúlar | Rakstrarjáttan | 781.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23.6.16 | Fróðskaparsetur Føroya | Rakstrarjáttan | 4.014.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 23.6.20 | Granskingarráð Føroya | Rakstrarjáttan | 55.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.6.24 | ES-granskingarskrá | Stuðulsjáttan | 1.100.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 23.7.04 | Lestrarstuðul | Lógarb. játtan | -6.000.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 23.7.05 | Lestrarlán | Stuðulsjáttan | -900.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| 24.2.06 | Leiklist | Rakstrarjáttan | 121.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 24.3.03 | Søvn landsins | Rakstrarjáttan | 1.766.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og eykajáttan umbiðin í sept. |
| 24.3.22 | Listasøvn | Rakstrarjáttan | 50.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 24.6.06 | Ítróttarsamband Føroya | Stuðulsjáttan | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í sept. |
| **Tilsamans** | | | **17.469.000** | |

## Meting av útreiðslum á §7 í 2018 samanborið við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | **FL-2018** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 101.436 | 100.136 | -1.300 | -1,3% |
| Rakstrarjáttan | 845.312 | 870.081 | 24.769 | 2,9% |
| Lógarbundin játtan | 128.035 | 122.035 | -6.000 | -4,7% |
| **Tilsamans** | **1.074.783** | **1.092.252** | **17.469** | **1,6%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 21.849 | 2,0% |

# § 11 Heilsu- og innlendismál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.24 | Heilsu- og innlendismálaráðið | Rakstrarjáttan | -231.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 14.1.03. | Útreiðslur av vali | Rakstrarjáttan | 64.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 14.1.13. | Familjufyrisitingin | Rakstrarjáttan | 10.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.1.04. | Upplýsing og ráðgeving | Rakstrarjáttan | 347.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.1.07. | Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu | Stuðulsjáttan | 239.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.1.10. | Koppsetingar | Lógarb.játtan | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.1.10. | Heilsukanningar av barnakonum | Lógarb.játtan | 200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.02. | Heilsutrygd | Rakstrarjáttan | 253.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 20.2.03. | Heilsutrygdarveitingar | Rakstrarjáttan | 4.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.04. | Kommunulæknaskipanin | Rakstrarjáttan | 792.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.05. | Útbúgving av yngri læknum | Rakstrarjáttan | 198.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.2.06. | Økisheilsuskipanin | Rakstrarjáttan | -256.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.11. | Ílegusavnið | Rakstrarjáttan | 126.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.3.04. | Landssjúkrahúsið | Rakstrarjáttan | 34.149.000 | Eykajáttan samtykt í apríl, fíggjarnevndarskjal í juni og eykajáttan umbiðin í sept. |
| | | | | *framhald...* |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20.3.10. | Klaksvíkar sjúkrahús | Rakstrarjáttan | 2.200.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.3.15. | Suðuroyar sjúkrahús | Rakstrarjáttan | 2.000.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.3.19. | Serstakur sjúkrahúsheilivágur | Rakstrarjáttan | 3.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.24. | Sjúklingatrygging | Lógarb.játtan | 3.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.25. | Hvíldarheimið Naina | Rakstrarjáttan | 243.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.3.30. | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu | Rakstrarjáttan | 128.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.4.02. | Viðgerðarstovnurin Heilbrigdið | Rakstrarjáttan | 149.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 20.4.03. | Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið | Rakstrarjáttan | 1.194.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 20.4.04. | Viðgerðarstovnurin Frælsi | Rakstrarjáttan | 1.063.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl |
| 21.3.12. | Gigni - heilsufrøði fyri børn og ung | Rakstrarjáttan | 361.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 37.1.10. | El-nevndin | Rakstrarjáttan | 125.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 37.4.02. | Umhvørvisstovan | Rakstrarjáttan | 658.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **52.704.000** | |

## Meting av útreiðslum á §11 í 2018 sammett við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | **FL-2018** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 1.244 | 944 | -300 | -24,1% |
| Rakstrarjáttan | 1.105.224 | 1.154.528 | 49.304 | 4,5% |
| Lógarbundin játtan | 7.930 | 11.630 | 3.700 | 46,7% |
| **Tilsamans** | **1.114.398** | **1.167.102** | **52.704** | **4,7%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 24.504 | 2,2% |

# § 12 Almannamál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.26. | Almannamálaráðið | Rakstrarjáttan | 36.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 21.1.02. | Almannaverkið | Rakstrarjáttan | 1.331.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 21.1.08. | Dugni - skúlin | Rakstrarjáttan | 94.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 21.1.12. | Endurmenning | Rakstrarjáttan | 160.000 | Eykajáttan umbiðin í apríl |
| 21.3.01. | Barnavernd | Lógarb. játtan | 2.480.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.03. | Einkjubarnastyrkur | Lógarb. játtan | 200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.04. | Barnapeningur veittur í forskoti | Lógarb. játtan | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.09. | Familjuískoyti | Lógarb. játtan | -650.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.4.01. | Dagpeningaskipanin | Lógarb. játtan | 3.150.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.6.09. | Trivnaðartænatur | Rakstrarjáttan | 11.060.000 | Eykajáttanir samtyktar í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 21.6.19. | Dugni - endurbúgving | Rakstrarjáttan | 137.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 21.6.20. | Sjóndepilin | Rakstrarjáttan | 111.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 21.7.01. | Vanlig forsorg | Lógarb. játtan | 1.650.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og umbiðin í september |
| 21.8.05. | Fyritíðarpensjón | Lógarb. játtan | -500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.8.13. | Viðbót til ávísar pensjónistar | Lógarb. játtan | 3.300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **21.559.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 12 í 2018 samanborið við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | **FL-2018** | **Meting 2018** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 16.819 | 16.819 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 398.929 | 411.858 | 12.929 | 3,2% |
| Lógarbundin játtan | 1.077.412 | 1.086.042 | 8.630 | 0,8% |
| **Tilsamans** | **1.493.160** | **1.514.719** | **21.559** | **1,4%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 10.229 | 0,7% |

# § 13 Uttanríkis- og vinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.59. | Uttanríkis- og vinnumálaráðið | Rakstrarjáttan | 230.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og mett frávik |
| 13.1.01. | Sendistovur | Rakstrarjáttan | -60.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 32.1.03. | Jarðfeingi | Rakstrarjáttan | 269.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 32.1.04. | Djóralæknatænastan | Rakstrarjáttan | -100.000 | Mett frávik |
| 35.1.08. | Sjóvinnustýrið | Rakstrarjáttan | 267.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 35.1.11. | Havnaeftirlit við fremmandum skipum | Rakstrarjáttan | -1.400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 37.1.15. | Brúkaraumboð | Rakstrarjáttan | 26.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 37.1.20. | Vinnustovnurin | Rakstrarjáttan | 153.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 37.5.04. | Heilsufrøðiliga starvsstovan | Rakstrarjáttan | 704.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **89.000** | |

## Meting av útreiðslum á § 13 í 2018 samanborið við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 49.575 | 49.575 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 63.167 | 63.256 | 89 | 0,1% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **112.742** | **112.831** | **89** | **0,1%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 2.039 | 1,8% |

# § 17 Samferðslumál

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.60. | Samferðslumálaráðið | Rakstrarjáttan | -91.000 | Eykajáttan samtykt í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 38.1.02. | Landsverk | Rakstrarjáttan | 1.799.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 38.2.01. | Strandfaraskip landsins | Rakstrarjáttan | 2.171.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 38.4.01. | Akstovan | Rakstrarjáttan | 224.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| 39.1.01. | Semingsmannaskipanin | Rakstrarjáttan | 300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 39.1.07. | Arbeiðs- og brunaeftirlitið | Rakstrarjáttan | 181.000 | Eykajáttan samtykt í apríl |
| **Tilsamans** | | | **4.584.000** | |

## Meting av útreiðslum á §17 í 2018 samanborið við fíggjarlógina fyri 2018

| *1.000 kr.* | FL-2018 | Meting 2018 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 38.900 | 38.900 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 232.950 | 237.534 | 4.584 | 2,0% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **271.850** | **276.434** | **4.584** | **1,7%** |
| | | | | |
| Harav eykajáttan til lønarhækkingar | | | 4.484 | 1,7% |

# § 20 Inntøkur

## Játtanarliga støðan í september 2018

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 50.2.10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.01. | Vanligur landsskattur | Ógreinað | 32.600.000 | Nýggj meting |
| 52.1.04. | FAS-skipanin | Ógreinað | -27.320.000 | Nýggj meting |
| 52.1.07. | Felagsskattur | Ógreinað | -27.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.11. | Kapitalvinningsskattur | Ógreinað | 35.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | 8.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.25. | Arvavgjald | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.04. | Tollavgjøld | Ógreinað | -4.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.10. | Lønhæddaravgjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.13. | Brennioljugjald | Ógreinað | 5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.14. | Loyvisgjald á alivinnu | Ógreinað | -26.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.15. | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | 13.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.19. | Skrásetingargjald | Ógreinað | 25.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.22. | Vegskattur | Ógreinað | 6.000.000 | Nýggj meting |

*framhald...*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 52.2.30. | Tinglýsingargjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.01. | Útluting úr Fíggingargrunninum | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.04. | Útluting frá partafeløgum og grunnum | Ógreinað | -10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.01. | Endurrindan av keyps-MVG | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.04. | Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur | Ógreinað | -2.850.000 | Nýggj meting |
| **Tilsamans** | | | **25.130.000** | |

## Løgujáttanareftirlit í fíggjarárinum 2018

Løgukarmurin í fíggjarlógini fyri 2018 er 364 mió. kr. tilsamans. Hetta er uttan játtanirnar til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar og Talgildu Føroyar, sum eftir játtanarskipanini eru rakstrarjáttanir í 2018. Harafturat eru um 62 mió. kr. fluttar frá undanfarnum árum, og eykajáttanir eru samtyktar og umbidnar fyri tilsamans um 11 mió. kr. Samlaða játtanin til løgur í 2018 við framfluttum játtanum og eykajáttanum er sostatt um 437 mió. kr. í 2018.

Roknast kann við, at um 404 mió. kr. netto verða nýttar av løgujáttanunum í 2018. Torført er at meta um nýtsluna av løgujáttanum fyri alt árið, og metingarnar skulu tí lesast við fyrivarni.

| *Heiti (1.000 kr.)* | Flutt frá eldri árum | FL 2018 | EyJ 2018 | Játtan tilsamans 2018 | Mett nýtsla 2018 | Mett flyting til 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1 Løgtingið** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** | **0** | **2.700** | **0** | **2.700** | **2.700** | **0** |
| Umbygging í Tinganesi | 0 | 2.700 | 0 | 2.700 | 2.700 | 0 |
| **§ 3 Fíggjarmál**** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **§ 5 Fiskivinnumál** | **2.119** | **86.500** | **0** | **88.619** | **88.619** | **0** |
| Búnaðarstovan | 0 | 1.500 | 0 | 1.500 | 1.500 | 0 |
| Nýtt havrannsóknarskip | 2.119 | 85.000 | 0 | 87.119 | 87.119 | 0 |
| **§ 7 Mentamál** | **35.727** | **86.600** | **2.130** | **124.457** | **108.957** | **15.500** |
| Skúladepil við Marknagil | 31.270 | 63.500 | 0 | 94.770 | 94.770 | 0 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 0 | 5.000 | 0 | 5.000 | 1.000 | 4.000 |
| Tjóðleikhús | 4.457 | 3.000 | 0 | 7.457 | 457 | 7.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 0 | 1.300 | 0 | 1.300 | 1.300 | 0 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 0 | 6.800 | 0 | 6.800 | 6.800 | 0 |
| Miðnám á Kambsdali | 0 | 5.000 | 0 | 5.000 | 500 | 4.500 |
| Varðveiting av mentanararvinum | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Savnshús | 0 | 0 | 2.130* | 2.130 | 2.130 | 0 |

*framhald...*

*...framhald*

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 11 Heilsu- og innlendismál** | **1.108** | **120.000** | **-7.500** | **113.608** | **113.608** | **0** |
| Medicoteknisk tól | 0 | 13.000 | 0 | 13.000 | 13.000 | 0 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging | 1.108 | 93.000 | 0 | 94.108 | 94.108 | 0 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 0 | 10.000 | -7.500* | 2.500 | 2.500 | 0 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 0 | 4.000 | 0 | 4.000 | 4.000 | 0 |
| | | | | | | |
| **§ 12 Almannamál** | **19.763** | **31.000** | **0** | **50.763** | **20.763** | **30.000** |
| Dugni - skúlin | 0 | 2.000 | 0 | 2.000 | 2.000 | 0 |
| Bústovnar o.a. | 19.763 | 29.000 | 0 | 48.763 | 18.763 | 30.000 |
| | | | | | | |
| **§ 13 Uttanríkis- og vinnumál** | **0** | **5.000** | **0** | **5.000** | **1.000** | **4.000** |
| Sjóvinnustýrið, bygningur | 0 | 5.000 | 0 | 5.000 | 1.000 | 4.000 |
| | | | | | | |
| **§ 17 Samferðslumál*** ** | **3.255** | **32.200** | **16.000** | **51.455** | **68.455** | **0** |
| Umvæling av almennum bygningum | 0 | 21.000 | 0 | 21.000 | 21.000 | 0 |
| Almennir bygningar, søla | 0 | -30.000 | 0 | -30.000 | -13.000 | 0 |
| Nýggir landsvegir | 3.255 | 34.500 | 0 | 37.755 | 37.755 | 0 |
| Havnir | 0 | 3.200 | 0 | 3.200 | 3.200 | 0 |
| Strandfaraskip landsins | 0 | 3.500 | 16.000* | 19.500 | 19.500 | 0 |
| | | | | | | |
| **Løgujáttanir tilsamans** | **61.972** | **364.000** | **10.630** | **436.602** | **404.102** | **49.500** |

Viðmerkingar:
* Eykajáttan umbiðin í september 2018.
** Játtanin til Talgildu Føroyar er rakstrarjáttan undir § 3 í 2018.
*** Játtanin til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar er stuðulsjáttan undir § 17 í 2018.